# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Nr. 27 - Apríl 2016



**Hendingaríkt ár í Maskinmeistarafelagnum**

**Kanning hjá Trygdargrunninum**

**Fjølbroytt virksemi á Sjónámi**

**Merkið sum hentleikaflagg**

**Ringt at halda hvílireglurnar**

**Prógvhandan**

**Flogternur til bjargingarroynd**

ODDAGREIN

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Annfinnur Garðalíð
Jóan Petur Patursson
Elias Zachariassen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Føroya Skipara- & Navigatørfelag**
Smærugøta 9 A
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**Blaðhald**
Tey sum ynska at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst. MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**Forsíðumynd**
Ólavur Frederiksen.

**Umsiting og redaksjón**
**Press:** press@press.fo,
Øssur Winthereig, ossur@press.fo
tel. 218486
Ingolf S. Olsen, ingolf@press.fo
tel. 225077
Grækaris D. Magnussen, grakaris@press.fo
tel. 514444

**Umbróting,**
Jan Jacobsen, Prenta

**Prent og liðugtgerð**
Prenta 35 77 74

Upplag: 1800



Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum og limur í blaðnevndini. *Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Bachelorútbúgving neyðug fyri kappingarførið

Tað er í tøkum tíma, at farið verður undir eina tilgongd fram ímóti einari bachelorskipan fyri føroysku sjóvinnu-útbúgvingarnar. Tí skulu vit varðveita kappingarførið á altjóða maritima arbeiðsmarknaðinum, er neyðugt, at næmingar á Vinnuháskúlanum, sum hava hug til tað, kunnu fáa útbúgving á bachelorstigi. Og tá eru allar hurðar eisini opnar til útbúgvingar innan eitt nú shippingvinnuna og skipsverkfrøði.
Við at styrkja okkara førleikar innan sjóvinnuna, verða bæði FAS sjálvt og alt virksemið á landi í sambandi við FAS eisini styrkt.
Alternativið til føroyskar bachelor-útbúgvingar innan sjóvinnu er, at næmingar, sum ætla sær undir víðari lestur eftir at hava lokið tær tradi-sjonellu sjóvinnuútbúgvingarnar sum annaðhvørt maskinmeistari ella skips-førari, velja Vinnuháskúlan frá og fara beinleiðis uttanlands at nema sær út-búgving.
Tí er tað sera gott, at kjakið um sjóvinnu -útbúgvingarnar nú tykist menna seg aftur, so vit sum skjótast kunnu leggja lunnar undir eina bachelor-uppstiging á Vinnuháskúlanum.
Minni gott er tað, at sáttmálin fyri fiskiskip, sum yvirmannafeløgini skriv-aðu undir fyri níggju mánaðum síðani og Føroya Fiskimannafelag fyri skjótt einum ári síðani, ikki enn er enda-liga samanskrivaður. Tað líkist snøgt sagt ongum, og enn einaferð eru tað reiðararnir, sum bíðað verður eftir.
Reiðarafelagið átók sær samanskriving-ina eftir ein fund í Skálavík í heyst, har partarnir samdust um, hvussu tær tríggjar sáttmálasemjurnar skuldu skrivast inn í sjálvan sáttmálan.
Men onki er hent, og nú sigur Føroya Reiðarafelag seg ikki hava stundir til hetta í løtuni vegna luttøku í arbeið-num við fiskivinnunýskipanini.
Sjálvar sáttmálasamráðingarnar mun-du ikki komi í gongd, tá tær skuldu á vetri 2014, tí tá tóku reiðararnir lut í mill-umlanda fiskivinnusamráðingunum.
Tað tykist løgið, at Føroya Reiðarafelag hevur tíð til alt annað enn manningar-feløgini.

Páll Hansen

**Páll Hansen**
Formaður í Maskinmeistarafelagnum




























# INNIHALD


4 **Aðalfundur í MaskinmeistaraFelagnum**
Hendingaríkt ár í Maskinmeistarafelagnum.

10 John og Jóan Petur afturvaldir

11 Páll fer frá um tvey ár

12 Kjak um limagjaldið

14 Góðar vónir um LÍV

16 **Kanning hjá Trygdargrunnurin**
Lægri fiskaprísur, tá virki og skip hanga saman.

18 **Fjølbroytt virksemi á Sjónámi**
Á Sjónámi í Klaksvík útbúgva tey skipsatstøðarar og skiparar. Haraftrat hava tey nógv skeiðsvirksemi sum millum annað trygdarskeið.

22 **Flogternur til bjargingarroynd**
Eina ferð um árið verður skipað fyri serligari bjargingarroynd fyri komandi flogternum.

24 **Hentleikaflagg**
Føroysku manningarfeløgini royna at fáa flaggið av aftur FOC-listanum, men hini Norðurlondini berjast ímóti.

26 **Prógvhandan**

30 **Brot úr dagbók**
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum.

32 **Brot úr dagbók**
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum.

34 **Brennidepilin**
Esmar Müller, maskinmeistari.

36 **Ringt at halda hvílireglurnar**
Norðurlendska Maskinmeistarafelagið hevur á fundi í Havn víst á, at trupult er hjá reiðaríunum og arbeiðstakarum at halda hvílitíðina.

38 **Føðingardagar**

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Menn lýða á formansrøðuna.

# Hendingaríkt ár í Maskinmeistarafelagnum

**Sáttmálasamráðingar av øllum handa slagi, gerðarrættarmál, stríð um hentleikaflagg og tilgongdin at keypa LÍV eru bert nøkur av nógvu málunum, sum Maskinmeistarafelagið hevur arbeitt við seinasta árið. Aðalfundurin varð hildin í Østrøm í Havn 12. mars. Her er formansfrágreiðingin hjá Pálli Hansen, formanni, endurgivin eitt sindur stytt og redigerað**

Vælkomin á aðalfund.

Í ár eru 75 ár síðani Maskinmeistarafelagið varð sett á stovn. Hetta hendi í avhaldshúsinum í Havn, har 25 mans vóru savnaðir til stovningarfund tann 29. apríl 1941.

Í 2015 høvdu vit fleiri sáttmálasamráðingar. Eg fari í stuttum at taka saman um hesar og aðrar hendingar frá farna árið.

**Fiskiflotin**

Sáttmálasamráðingarnar við Føroya Reiðarafelag byrjaðu 19. januar í fjør, og longu 24. februar staðfestu partarnir, at semja var um part 1, sum er felagsreglurnar.

Síðan var byrjað uppá part 2, og eisini her gekst væl. Tað tók nakað av tíð at fáa trolararnar í Barentshavinum uppá pláss, men 18. apríl var eisini komið á mál við parti 2, og tá vóru samráðingarnar í veruleikanum lidnar.

Vit valdu tó at bíða við endaligari undirskriving, til vit vistu, hvat spurdist burturúr hinum samráðingunum.

Sum heild kann sigast, at vit eru nøgdir við sáttmálan. Tað man verða langt síðan, at so nógvar broytingar eru framdar, sum í hesum sáttmálanum.

Avtalað bleiv samstundis, at partarnir skuldu hittast aftur at samanskriva sáttmálarnar, og manningarfeløgini og Reiðarafelagið vóru í september í Skálavík at samanskriva semjurnar til ein nýggjan, felags sáttmála.

Hettar arbeiðið gekk sera væl, men bleiv ikki heilt liðugt tá orsakað av, at nakrir frádráttir skuldu kannast nærri. Talan er um § 17 í felagsreglunum, har allir frádráttir standa. Hetta bleiv sera drúgt og er ikki komi uppá pláss enn. Tann góði viljin, sum var til staðar í Skálavík fyri at fáa sáttmálan avgreiddan, vísur seg ikki at vera til staðar longur.

Eins og undanfarin ár blivu avtalur gjørdar fyri flutningsskip, nakað áðrenn makrelfiskiskapurin byrjaði.

Hettar varð gjørt millum Maskinmeistarafelagið og JFK, Varðan og NWP (Northwest Pelagic). Samstundis varð eisini avtala gjørd við p/f Jókin og p/f TG Fish. Hesar avtalur vóru ikki so nógv øðrvísi enn árini frammanundan,




ver.fo

FØROYATELE
einfalt samskifti

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Atkvøða við hondsupprættan.

og eg haldi, at vit eru í ferð við at finna tann rætta leistin nú. Nakað av turbulensi tók seg upp um skipið Asbjørn Senior. Skipið skyldaði nøkrum av okkara limum hýru, tá tað fór av landinum og undir fremmant flagg. Krøvini blivu so sett fram aftur, tá skipið aftur kom undir føroyskt flagg.

Tað vísti seg, at teir persónarnir, sum høvdu hildið seg til sáttmálan, eisini vóru teir, sum fingu sínar pengar, og tí vil eg loyva mær at koma við eini áheitan: Brúkið felagið meira, um tit hava ivaspurningar viðvíkjandi fastlønaravtalum og øðrum. Betur at spyrja, áðrenn ein skrivar undir enn aftaná.

Sáttmálin fyri fiskiskip kann sigast upp longu um eitt ár.

Í januar varð tann so nógv umtalaði arbeiðsbólkurin til endurskoðan av fiskivinnuni settur og stutt eftir fylgibólkarnir.

Øll trý manningarfeløgini eru umboðað í fylgibólkinum, har vinnan er umboðað. Vónandi verður hetta arbeiðið liðugt til ólavsøku, og fáa vit tá at síggja, hvussu tilmælið frá arbeiðsbólkinum fer at síggja út.

Saman við nýggjari fiskivinnuskipan fara vit helst eisini at síggja broytingar á sáttmálaøkinum.

**Reiðarafelagið fyri Farmaskip/FAS**

Fjúrtan dagar eftir síðsta aðalfund varð semja millum Reiðarafelagið fyri Farmaskip og Maskinmeistarafelagið skrivað undir.

Talan er um ein tvey ára sáttmála, og samanumtikið er talan um lønarhækkingar samsvarandi karminum á arbeiðsmarknaðinum.

Føroya Fiskimannafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag gjørdu sáttmálar nakað seinri, og vóru teir á sama støði.

Tíverri hevur kreppa tikið seg upp í frálandavinnuni, og hetta merkja eisini tey føroysku skipini innan hesa vinnu. Flestu frálandaskipini hava broytt útmynstringartíðina til fimm vikur.

**Sáttmáli fyri smærru handilsskipini**

Nakað eftir at sáttmálin við Reiðarafelagið fyri Farmaskip var skrivaður undir, bleiv nýggjur sáttmáli somuleiðis gjørdur við feløgini Frakt & Sand, Sandgrevstur, Sekstant og Vermland. Lønarhækkingarnar vóru eisini her samsvarandi karminum á arbeiðsmarknaðinum.

**Strandferðslan**

Tað bleiv nakað drúgt at bíða eftir úrskurðinum frá Fasta Gerðarrætti um jóladag, langafríggjadag og páskadag.

Úrskurðarfundur í málinum var 17. september, og sjálvur dómurin kom í oktober. Feløgini fingu viðhald í, at sigling hjá skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins ikki fevnir um sigling jóladag og langa fríggjadag.

Dómurin var tó eitt sindur ógreiður, tá tað kom til, hvussu gjaldast skuldi fyri hesar dagar.

Tann 4. november sendi Maskinmeistarafelagið so boð til Strandferðsluna um at gjalda limunum løn samsvarandi útrokningunum av fastlønarsáttmálanum.

Tá vit onki høvdu frætt frá mótpartinum í januar, sendu vit eina nýggja áheitan um at fáa málið avgreitt. Tað

heldur fram á næstu síðu >

vísti seg tá, at onkrar misskiljingar høvdu verið í teldusamskiftinum millum Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum og advokat felagsins. Hettar bleiv loyst, og fræ ttu vit tá frá Lønardeildini.

Svarið var, júst sum vit høvdu væntað, so tað skuldi verið skjótt, at fingið málið avgreitt, men striltið hevur gingist.

**Alment lønt og Magnus Heinason**
Sáttmálauppleggini fyri hetta økið vóru longu klár, tá løgtingsval bleiv útskrivað, men bíðað bleiv, til vit høvdu fingið nýtt stýri.

Vit fingu byrjan á við fundi millum Maskinmeistarafelagið og Lønardeildina 14. oktober, tá krøvini vórðu løgd fram.

Tað bleiv til fýra samráðingarumfør, har tosað varð um ymiskar møguleikar, men endin varð, at fyri alment settar maskinmeistarar á landi bleiv lønarhækkkingin 2,05 prosent í 2015 og 1,9 prosent í 2016, og eftirlønin hækkar frá 14,75 prosent til 15 prosent. Viðbøtur hækka við somu prosentum sum lønin.

Fyri Magnus Heinason hækkaði lønin 2,25 prosent í 2015 og 1,9 prosent í 2016. Eftirlønin hjá teimum var frammanundan 15 prosent.

Tann 11. november fekst semja millum partarnar, og hon bleiv so skrivað undir nakað seinni.

**MF og KAF**
Hesar samráðingarnar byrjaðu einar 14 dagar seinri enn tær fyri alment lønt, og høvdu vit seks samráðingarfundir. Tað gekk væl, og 16. desember bleiv skrivað undir semju um at endurnýggja sáttmálan.

Talan bleiv um ein tvey ára sáttmála galdandi frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017, og lønin hækkar 1. oktober 2015 við 1,03 prosentum og 1. oktober 2016 við 1,9 prosentum.

Umframt lønarhækkingarnar eru eisini aðrar ábøtur og dagføringar gjørdar í sáttmálanum, millum annað hækkaðu vaktargjøldini.

Felags fyri sáttmálarnar við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF), alment lønt á landi/sjógvi og Vinnuhúsið er, at her hava vit tað, sum tey kalla ein karm. Í ár var hann 4,15 prosent yvir tvey ár.

**Sáttmálasamráðingar 2016**
*Polar Princess*
Um hálvan februar høvdu vit samráðingar í Keypmannahavn við Polar Seafood um sáttmálan fyri maskinmeistarar við Polar Princess. Tað gekst væl og tvey ára avtala bleiv undirskrivað.

Í høvuðsheitum er talan um dagføringar av garantihýrum og hækking av nøkrum eykapørtum samsvarandi teimum hækkingum, sum gjørdar vórðu í føroyska sáttmálanum. Ein nágreining viðvíkjandi løn í samband við umvælingararbeiði er eisini gjørd.

Hesin sáttmáli fylgir annars stórt sæð teimum føroysku fyri sama fiskiskap.

*Føroya Arbeiðsgevarafelag*
Talan er her um sáttmálan fyri privata tænastu á landi, sum gongur út 1. juni, og hann er uppsagdur fra okkara síðu.

*Strandfaraskip Landsins*
Hesin sáttmálin gongur út 1. oktober, og fer hesin eisini at verða uppsagdur.

**FMU**
Feløgini í FMU hava allastaðni, har vit koma, roynt at gera sína ávirkan galdandi fyri at fáa skipini í FAS av FOC-listanum hjá ITF. Semja er um,



Nevndarval á skránni, Regin Olsen býtir út atkvøðuseðlar.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*

at "Beneficial ownership", tað er veruligi ognarskapurin, framvegis er ein trupulleiki.

Skip, sum eru føroysk og hava føroyskan eigara og manning, og útlendsk reiðarí sum ganga eftir avtalum við tey føroysku manningarfeløgini, ella norðurlendsk reiðarí, sum hava gjørt avtalur við tey føroysku manningarfeløgini, verða ikki rokna sum FOC-skip.

Hetta kann vera sera trupult hjá fólki at skilja, og gevur eisini trupulleikar, tá skip skulu gera avtalur við útlendskar fyritøkur, sum ikki kenna til føroysk viðurskifti.

Akkurát hvussu man loysir hendan trupulleikan, veit eg ikki, men feløgini í FMU fáa sjálvandi einki gjørt við "Genuine Link" (veruliga tilknýtið til flagg-landið), og tá FAS-skipanin fiskar innanfyri hjá okkara grannalondum og roknar hvønn bátahyl sum altjóðasjógv, so gevur hetta trupulleikar.

Í januar mánaða í ár boðaði Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, frá, at setast skuldi ein arbeiðsbólkur at orða ein nýggjan politikk og strategi fyri føroyska sjóvinnu. Maskinmeistarafelagið skal umboða manningarfeløgini (FMU) í hesum arbeiðsbólki.

Tveir fundir hava nú verið og sagt verður, at FOC ikki er ein partur av uppgávuni.

**NMF**

Tveir fundir hava verið hildnir í norðurlendska maskinmeistarafelagsskapinum NMF síðan síðsta aðalfund. Tann fyrri byrjaði á Christiansborg við eini áhugaverdari ráðstevnu um útbúgving. Úr Føroyum var millum annað Vinnumálráðið umboðað, og stjórin fyri Sjóvinnustýrið Hans Johannes á Brúgv tók eisini lut við einum sera áhugaverdum innleggi.

Í oktober var NMF-fundur í Oslo. Landarapportirnar vórðu lagdar fram, og har kundi staðfestast, at hóast tær nógvu uppsagnirnar í norska offshore-sektorinum, so eru framhaldandi fáir arbeiðsleysir maskinmeistarar í Skandinavia.

Á fundinum blivu eisini útbúgvingar og internationalt samstarv viðgjørd.

Næsti NMF-fundur verður í Føroyum (hesin fundur varð hildin 18. og 19. apríl, red.).

**Keypið av LÍV**

Fýra ár eru liðin, síðan fakfeløgini fóru undir eina tilgongd at keypa LÍV.

Nógvir snávingarsteinar eru fingnir av vegnum hesa tíðina, og umstøðurnar viðvíkjandi LÍV-3 eru nú avkláraðar. Vit meta, at LÍV er ein betur og tryggari fyritøka í dag, enn tá vit fóru í holtur við at fyrireika keypið av felagnum. Avlop hevur verið á rakstrinum tey seinastu árini, so hóast drúgvu tilgongdina er nógv hent til fyrimuns fyri tryggingartakaran.

**Samlagstryggingin í LÍV**

Feløgini hava gjørt nakrar justeringar viðvíkjandi samlagstryggingini. Vit hava verið í dialogi við LÍV um fylgjara, tá fólk fara av landinum til viðgerar. Hettar vísti seg ikki at vera so einfalt, so vit gjørdu í staðin av at hækka útgjaldið fyri hættisligar sjúkur upp í 125.000 krónur bæði fyri tryggingartakaran og børnini hjá honum. Vónandi kunnu vit í framtíðini finna eina loysn fyri fylgjara.

**Útbúgving**

Stór tilgongd er til maskinmeistara-útbúgvingarnar í teimum skandinavisku londunum, og stórsta tilgongdin er í Danmark, har 400 nýggir maskinmeistarar verða lidnir um árið, og talið er vaksandi.

Á Vinnuhskúlanum verður arbeitt við at fáa eina aspirantskipan fyri maskinmeistarar uppá pláss, og roknað verður við, at klárt er at byrja eftir summarfrítíðina næsta ár.

Skal kappingarførið á altjóða arbeiðsmarknaðinum varðveitast, eiga stig at verða tikin til bachelor-útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum, men rúm skal eisini verða fyri verandi útbúgvingum, tí tørvur er á báðum. Bachelor kundi komið inn sum ein



Fundarfólkið fylgdi væl við í tí, ið sagt var av talarastólinum og víst við uppvørpu.




Páll Nielsen advokatur, var orðstýrari.

yvirbygningur á verandi útbúgvingum á Vinnuháskúlanum.

Í Danmark bjóða onkrir av maskinmeistaraskúlunum fram útbúgving sum skipsinspektørur (Vessel Manager). Hettar kundi verið eitt hugskot hjá skúlanum at prøva.

**Sjóvinnustýrið/eftirlit**

Í juli mánaða í fjør kærdi Maskinmeistarafelagið manningarskjølini hjá Silver River og Silver Lake hjá norska Fjord Skipping AS.

Skipini høvdu framtøkumegi á 3000 kW og vóru mannaði við einum maskinisti. Felagið helt, at skipini skuldu mannast samsvarandi ásetingunum í lóg um manning av skipum og kærdi málið til Sjóvinnuráðið.

Sjóvinnuráðið viðgjørt málið og Maskinmeistarafelagið fekk viðhald. Men sjálvt um vit vunnu málið, lætst Sjóvinnustýrið ikki um vón, og Silver Lake og Silver River hildu áfram at sigla við gamla manningarskjalinum.

Ikki fyrr enn Maskinmeistarafelagið skrivaði til landsstýrismannin og átalaði framferðina hjá Sjóvinnustýrinum, komu nýggj manningarskjøl.

Framtøkumegin hjá skipunum var nú lækkað úr 3000 kW niður í 2999 kW. Fuelrack var flutt frá 44,5 mm til 44,2 mm.

Maskinmeistarafelagið heldur, at hendan avgerðin hjá Sjóvinnustýrinum ikki er í samsvar við andan og ætlanina við lógarbroytingunum, sum vórðu framdar síðsta vár.

Felagið skrivaði tí til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið og vísti á hendan skeiva framgangsmátan.

Hettar førdi tað við sær, at vit saman við Sjóvinnustýrinum blivu kallaðir inn til fund við landsstýrismannin.

Maskinmeistarafelagið vísti á, at høvuðsuppgávan hjá Sjóvinnustýrinum eigur at vera trygdin á sjónum, meðan kappingarførið ikki er ein uppgáva hjá stýrinum at røkja.

Fundurin endaði við, at landsstýrismaðurin segði seg vera opnan fyri at taka stig til eina lógarbroyting, um tað verður mett at vera rætta leiðin.

**Trygdargrunnurin**

Tað hevur gingið sera væl hjá Trygdargrunninum, síðan vinnan yvirtók hann í 2011. Grunnurin hevur ment seg nógv og er sera vælvirkandi í dag. Eginognin er farin upp um 100 milliónir krónur. Økingin tey seinastu trý árini í minstuløn og minstaforvinningi hevur verið ávikavist 43 prosent, úr 700 krónum upp í 1.000 krónur um dagin, og 50 prosent, úr 12.000 krónum upp í 18.000 krónur um mánaðin.

**Mið og Magn**

Blaðnevndin valdi í fjør at umskipa blaðútgávuna og gjørdi avtalu við felagið PRESS um blaðútgávuna. Hetta samstarv hevur riggað væl, og blaðið skal eftir ætlan koma fýra ferðir út í ár.

**Keðiliga støðan í Noregi**

Eg tosaði við norska starvsbróður mín síðst í januar, og hann segði, at fyri fyrstu ferð í søguni hjá norska felagnum vóru nú arbeiðsleysir maskinmeistarar. Tó hava fleiri maskinmeistarar fingið arbeiði í fiskivinnuni, á brunnbátum og á ferjum.

Hann segði eisini, at føroyingar vóru sera væl dámdir í norsku vinnuni, tí teir dugdu at brúka sínar hendur.

Í januar vóru 200 arbeiðsleysir maskinmeistarar í Noregi, og teir roknaðu ikki við nakrari broyting fyrr enn út á heystið 2017.

**Skrivstovan og annað**

Arbeiðið á skrivstovuni gongur fyrimyndarliga væl. Felagið er væl fyri fíggjarliga, og roknskapurin sær fornuftigur út. Vit hava stigvíst fríðkað um ognina hjá felagnum tey síðstu árini, og halda vit fram í ár við at gera túnið av nýggjum.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Jóan Petur Patursson, vinstrumegin, hevði føðingardag og fekk eitt nýtt nevndarskeið í føðingardagsgávu. Eisini John Højsted, høgrumegin, varð afturvaldur.



Petur Skeel Dahl er nýggjur tiltakslimur saman við Hans Ingvard Joensen, sum var til skips og tí ikki kundi vera til staðar á aðalfundinum.

# John og Jóan Petur afturvaldir

Sum altíð var nevndarval eisini á skrá á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum, og í ár stóðu John Højsted og Jóan Petur Patursson fyri vali.

Teir stillaðu báðir uppaftur, og harafturat varð Hans Ingvard Joensen, ið siglir við Jupiter, eisini uppstillaður. Hann var til skips og kundi tískil ikki vera til staðar á aðalfundinum.

Tað gjørdist eitt tætt val. Teir báðir John Højsted og Jóan Petur Patursson vórðu afturvaldir við hvør sínum 19 atkvøðum, og Hans Ingvard Joensen fekk 15 atkvøður.

Hans Ingvard Joensen og Petur Skeel Dahl vóru síðani uttan atkvøðugreiðslu valdir sum tiltakslimir. Petur Skeel Dahl skjeyt sjálvur upp, at Hans Ingvard Joensen varð fyrsti tiltakslimur og hann sjálvur annar tiltakslimur.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, endaði sína formansrøðu á aðalfundinum við at boða frá, at hann stillar ikki upp aftur, tá formansskeiðið endar á vári 2018. Tá er hann fyltur 70 ár.

# Páll fer frá um tvey ár

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum er farin um tey 70, tá formansskeiðið hjá honum rennur út í 2018, og á aðalfundinum boðaði hann frá, at hann ikki stillar uppaftur.

Síðani 2007 hevur Páll Hansen verið formaður í Maskinmeistarafelagnum, men tá hetta skeiðið rennur út á vári 2018, endar tann kapittulin hjá honum og felagnum.

Tí á aðalfundinum í mars endaði Páll Hansen sína formansrøðu við at boða frá, at hann ikki stillar upp aftur til formansvalið.

- Felagið skal um tvey ár hava nýggjan formann, so teir, sum hava hug til formansstarvið, kunnu longu nú byrja at fyrireika seg. Endamál felagsins er áhaldandi at styrkja og verja limanna rættindi og kor, og tað vil altíð verða stavnhaldið, segði hann.

Hóast aldur ikki sæst á formanninum, so kann hann við góðari samvitsku lata seg pensjonera tá, tí 20. november 2017, nakrar mánaðir fyri aðalfundin í 2018, fyllir hann 70 ár.

- Tá man eg hava tænt fyri meg, og tað er ongantíð gott at grógva fastur í einum sessi sum hesum, so nú mugu aðrar kreftir sleppa framat, sigur Páll Hansen.

Hann starvaðist sum vaktmeistari hjá SEV á Sundi, til hann gjørdist fulltíðar formaður í Maskinmeistarafelagnum, men reglurnar hjá SEV siga, at starvsfólk skulu á eftirløn, tá tey fylla 67 - og tað gjørdi Páll Hansen fyri skjótt hálvum øðrum ári síðani.

tekstur og myndir: INGOLF S. OLSEN -PRESS

Jógvan Isaksen úr Klaksvík helt, at man í Føroyum er farin ov langt frá sosialu hugsanini um, at tær breiðastu herðarnar eiga at bera tær tyngstu byrðarnar. Hann mælti frá at seta hámark á limagjaldið.



# Kjak um limagjaldið

**Tvey uppskot um broyting í limagjaldinum vórðu viðgjørd á aðalfundinum. Eitt uppskot um at seta eitt hámark á 5000 krónur um árið á limagjaldið fall, meðan uppskotið hjá nevndini um at lækka limagjaldið við 0,1 prosentstigi og samstundis minka inngjaldið í Stuðulsgrunnin vann frama.**

Limagjaldið var tað evnið, sum fylti nógv mest í kjakinum á aðalfundinum, og ikki minni enn tvey uppskot um broytingar í limagjaldinum vórðu viðgjørd.

Annað uppskotið, sum var innkomið frá limum, gekk út upp á at seta eitt hámark á limagjaldið á 5000 krónur um árið.

Hitt uppskotið átti nevndin sjálv, og tað gekk út upp á at lækka limagjaldið við 0,1 prosentstigi, úr 1,2 niður í 1,1 prosent, og samstundis lækka partin av limagjaldinum, sum fer í Stuðulsgrunnin, úr 20 niður í 10 prosent.

### Vansar við hámarki

Páll Hansen helt, at faddrarnir til uppskotið um at seta hámark á limagjaldið ikki høvdu hugsað alt nóg væl ígjøgnum, og hann vísti á nakrar ítøkiligar vansar við tí uppskotinum.

Hann helt grundleggjandi, at eitt hámark á 5000 krónur í limagjaldi um árið vendir sosialt skeivt.

- Stórur partur av okkara limum hevur eina inntøku á millum 30.000 og 35.000 krónur um mánaðin, og skulu tí framhaldandi gjalda fult limagjald, um hámarkið er 5000 krónur, meðan bert inntøkurnar omanfyri 35.000 krónur um mánaðin fara at fáa fíggjarligan fyrimun av hámarkinum. Um onkur, sum tað er blivið nevnt, hevur goldið 25.000 krónur í limagjaldi, so hevur viðkomandi eisini tjent tvær milliónir krónur tað árið, segði hann. Formaðurin vísti eisini á, at støðugt fleiri fara at raka loftið í komandi árum, um eitt hámark verður ásett sum eitt krónutal.

- Tað vil vera heilt óvanligt, um lønirnar ikki eisini fram eftir fara at hækka eitt sindur í sambandi við sáttmálasamráðingar. Tí má eitt hámark onkursvegna fylgja kørmunum og ikki læsast fast í einum ávísum krónutali, segði Páll Hansen.

### Ráð til lækking

Hann mælti til heldur at samtykkja uppskotið hjá nevndini um at lækka limagjaldið og inngjaldið í Stuðulsgrunnin.

- Við tí fáa allir limirnir ágóðan av lækkingini, uttan at tað gongur út yvir raksturin av felagnum. Stuðulsgrunnurin er væl fyri, og vit meta, at hann væl tolir hesa lækkingina í inngjaldinum, segði Páll Hansen.

Hann upplýsti, at útgjaldið úr grunninum hesi seinastu árini hevur ligið um 100.000 krónur um árið.

### Broyting til tað betra

Fleiri viðmerkingar vóru úr salinum til uppskotini, men Jógvan Isaksen úr Klaksvík fór á talarastólin, har hann staðiliga mælti frá at seta eitt krónutal sum hámark á limagjaldið.
Hann greiddi frá, at hann hevur tikið lut á teimum flestu aðalfundunum hjá Maskinmeistarafelagnum síðani fyrst í 1980-árunum, og at tað øll tey fyrstu árini snúið seg um at hækka limagjaldið, tí raksturin var so tungur - eisini sjálvt um ongin Stuðulsgrunnur var til tá.

- Nú havi eg kannað hetta eitt sindur og eri komin fram til, at næstan øll fakfeløg áseta limagjaldið sum eitt

prosenttal av lønini, og vit liggja alvorliga í tí lægra endanum - eg haldi, at tað bara eru navigatørarnir, sum liggja lægri, tí teir tjena so væl, at prosentið kann haldast niðri.

- Hesi árini, eg havi gingið á aðalfund, er hend ein ótrúlig broyting til tað betra í Maskinmeistarafelagnum. Frá at roknskapurin altíð hevði undirskot, vit mangladu pengar og máttu støðugt hækka limagjaldið, til dagin í dag, har vit eiga eitt deiligt hús og nóg mikið av pengum.



Páll Hansen mælti vegna nevndina til eina generella lækking av limagjaldinum úr 1,2 niður í 1,1 prosent heldur enn at seta hámark á limagjaldið hjá teimum, ið tjena mest. Og ein greiður meiriluti á aðalfundinum fylgdi formansins tilmæli.

- Men eg ræðist at enda aftur í gomlu støðuni. Hesi seinastu fimm árini hava vit havt fulltíðarløntan formann, og tað hevur verið ógvuliga gott skil í felagnum. Men tað økir sjálvsagt um útreiðslurnar, og eisini tí er tað púra burturvið at seta hámark á limagjaldið. At nevndin hinvegin sjálv heldur, at tað ber til at gera eina generella lækking í prosentgjaldinum, tað taki eg til eftirtektar, segði Jógvan Isaksen.

Hann mælti aðalfundinum til at hugsa samhaldsfast.

**Breiðastu herðarnar**

- Eg haldi, at vit í Føroyum eru farin ov langt frá tí sosialu hugsanini, at tær breiðastu herðarnar skulu bera tær tyngstu byrðarnar. Ta grundregluna haldi eg vera í fínasta lagi, tí tey, ið rinda mest í limagjaldi, hava eisini tjent flest pengar og hava ráð at betala, segði Jógvan Isaksen og mælti aðalfundinum til at samtykkja uppskotið hjá nevndini og vraka hitt uppskotið.

Og soleiðis bleiv. Ein greiður meiriluti feldi uppskotið um at seta hámark á limagjaldið og samtykti uppskotið hjá nevndini um at lækka limagjaldið hjá øllum við 0,1 prosentstigi.







Umleið 600 limir eru í Maskinmeistarfelagnum, harav 485 eru aktivir í løtuni. Hetta talið hevur í mong ár ligið og sveiggjað báðu megin 500. Talvurnar vísa, hvar limirnir starvast.

**Stuðulsgrunnurin:**

Stuðulsgrunnurin hjá Maskinmeistarafelagnum varð stovnaður í 1995, og í viðtøkunum fyri grunnin er endamálið soleiðis lýst:,

***§ 2. Endamál.***

*Endamál grunnsins er at veita stuðul til limir í lógligum verkfalli. Grunnurin kann eisini veita hjálp ella stuðul til limir ella teirra avvarðandi, ið av eini hvørji orsøk eru komin serliga illa fyri fíggjarliga.*

**Roknskapurin**

Maskinmeistarafelagið hevur ráð at lækka limagjaldið eitt sindur. Úrslitið í 2015 var góðar 600.000 krónur, og ognin hjá felagnum var 7,5 milliónir krónur, harav 5,8 milliónir krónur eru tøkur peningur.

Roknskapurin hjá Stuðulsgrunninum er ikki almennur, men á aðalfundinum var staðfest, at grunnurin er væl fyri.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*




Maskinmeistarafelagið og hini fakfeløgini í sp/f Fakfelag vóna, at keypið av LÍV verður veruleiki í summar.

# Góðar vónir um LÍV

**Í síni ársfrágreiðing var Páll Hansen varin við at tíðarfesta, nær keypið av LÍV verður veruleiki, men aftaná aðalfundin er gongd komin á keypstilgongdina, og hann vónar, at komið er á mál í summar.**

- Gamalt var ikki at kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur, men eg vóni, at vit og hini fakfeløgini í sp/f Fakfelag eru komin á mál við keypinum av LÍV í summar, vónandi fyri summarfrítíðina.

Tað sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, sum annars í síni formansfrágreiðing á aðalfundinum í mars var meira varin við at tíðarfesta endaliga keypið av LÍV.
Beint fyri jól hevði sp/f Fakfelag fund við nýggja landsstýrismannin, tí felagið væntaði, at ætlaðu broytingar á pensiónsøkinum hjá samgonguni kundu elva til broytingar í avtalaðu treytunum fyri keypinum. Hetta tí politiska ætlanin í løtuni tykist vera at hækka Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin (Sameg), og tað vil í so fall hava ávirkan á inngjaldið.

- Í januar høvdu vit aftur fund við Poul Michelsen, sum varðar av almenna ognarpartinum í LÍV. Tá varð avtalað at taka eitt time-out til 1. apríl, tí tá skuldi arbeiðið hjá politisku myndugleikunum við eftirlønarlóggávuni verið komið so mikið áleiðis, at tað fór at gera sær eina mynd av framtíðar eftirlønarøkinum. Og síðani tá er ferð so av álvara sett á aftur tilgongdina, sigur Páll Hansen.

# Tú ringir
# vit heinta

Telefon 41 42 43




## Gev spilloljuni **nýtt** virði

IRF

**IRF** · Telefax: 41 42 44 · FO-520 Leirvík · irf@irf.fo

tekstur: **ØSSUR WINTHEREIG**-*PRESS*



Bæði í Trygdargrunninum og á Fiskamarknaði Føroya, hava tey staðfest, at munur er á miðal søluprísinum, alt eftir um samanfall er millum skip og virki. *Mynd: Zacharis Hammer*

# Lægri fiskaprísur, tá virki og skip hanga saman

**Trygdargrunnurin hevur gjørt eina kanning, sum vísir, at miðalprísurin á fiski er lægri, tá virki keypa fisk frá skipum, sum virkini eiga ella hava serligan áhuga í. Prísurin, sum fæst á Fiskamarknaði Føroya er nakað hægri.**

Munur er á prísinum sum fæst fyri fiskin, tá hugt verður eftir, um samanfall er millum keyparar, sum hava áhugamál í skipunum og keyparum, sum einki hava við skipið at gera.

Hetta er niðurstøðan í eini kanning, sum Niklas Hansson og Reidar Luid hava gjørt fyri Trygdargrunnin.

Niðurstøðan er, at uttan mun til slag av fiski, árstíð og vekt, so var miðalprísurin í 2015 lægri, tá fiskurin var seldur beinleiðis til virki, har samanfall var millum skip og virkið.

- Við teimum tølum, sum vit hava arbeitt við, er avgerandi munur á prísinum, tá skip og virki er knýtt at hvørjum øðrum og tá einki samband er ímillum, sigur Niklas Hansson.

Kanningin setur tríggjar frymlar upp.

Í einum verður kannað, um munur er á miðalprísinum, tá ymisk skip selja beinleiðis til virkini. Í tí førinum er niðurstøðan, at er samanfall millum skip og virki, er miðalprísurin umleið 50 oyru lægri enn prísurin, tey skipini fáa, sum einki samband hava við virkið.

Í øðrum frymlinum verður kannað, um munur er á miðalprísinum hjá skipum, sum ikki eru knýtt at einum virki, tá tey selja á uppboðssøluni, og tá tey selja beinleiðis til virkini. Kanningin vísir, at miðalprísurin hjá Fiskamarknaðinum er 1,16 krónur kilo hægri enn prísurin, sum skipini fáa, tá tey selja beinleiðis til virkini.

Triði frymilin snýr seg um miðalprísin, ið skip, sum eru knýtt at virkjunum, fáa frá virkjunum, og hvat onnur skip fáa á uppboðssøluni. Her vísir kanningin, at miðalprísurin, sum skipini hjá virkjunum fáa, tá tey landa beinleiðis til virkini, var 1,67 krónur kilo lægri enn hjá teimum, sum landaðu til Fiskamarknaðin.

Stjórin í Trygdargrunninum, Magni á Deild Olsen, er tó varin at draga ov avgjørdar meiningar burturúr kanningini.

- Vit vita ikki rættuliga, hvørjar útreiðslur skulu dragast frá, so helst er neyðugt at fara nærri inn í tølini, um avgjørdar niðurstøður skulu gerast, sigur Magni á Deild Olsen.

Kanningin byggir á hagtøl frá Vørn og verður sagt soleiðis um endamálið: Endamálið við kanningini er at kanna, um nakar munur er á kiloprísi fyri fisk, alt eftir um keypari hevur áhugamál í skipinum, ið selur fiskin.

- Okkara kanning vísir, at har er stórur munur, men kanningin sigur einki um hví, ella um onkur serlig frágreiðing er til tað, sigur Reidar Luid.

Samanberingin er gjørd bæði millum skip, sum hava selt umvegis Fiskamarknað Føroya og skip, sum hava selt beinleiðis til virkini, og so hevur verið hugt eftir, hvussu ognarviðurskiftini vóru.

Kanningin er bara gjørd fyri trolarar – skipabólk 2, tí tað er í tí bólkinum, at nógv samanfall er millum reiðarí og virki.



Kanningin hjá Trygdargrunninum umfatar trolarar, tí tað er í tí skipabólkinum, at samanhangurin millum skip og virki sæst best. *Mynd: Zacharis Hammer*

**Skuldseting um rán**

Ein av orsøkunum til, at Trygdargrunnurin fór at kanna prísirnar, var oddagreinin í seinasta "Mið og Magn", har Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelagnum, róði framundir, at tað fer eitt rán fram í Trygdargrunninum.

- Frá at hava ein skipan, har menn fingu garanterað minstuløn, tá illa vildi til, fingu vit eina skipan, sum av summum reiðarum, ið annaðhvørt sjálvir eiga virki ella móttøkuskip, verður brúkt til at garantera, at menn ongantíð fara upp um minstulønina, skrivaði Annfinnnur Garðalíð.

Hann skuldsetti summi reiðarí fyri at halda avreiðingarprísinum niðri fyri at skúma róman í góðskingarliðnum.

- Harvið rinda teir eisini minst møguligt inn í Trygdargrunnin, men belasta útgjaldið maksimalt. Hetta er eitt rán úr Trygdargrunninum, sum vit ikki framhaldandi kunnu standa modell til, skrivaði Annfinnur Garðalíð.

Annfinnur Garðalíð ásannar, at kanningin ikki beinleiðis sigur nakað um, at summi reiðarí pressa prísirnar fyri at halda monnum undir minstuløn, men hann staðfestir samstundis, at tá søluprísurin er lægri, so lækkar inngjaldið til Trygdargrunnin tilsvarandi.

- Tað var tað, sum eg eisini hugsaði um, tá eg spurdi, um tað er rán ella stuðul, sigur Annfinnur Garðalíð.



Stjórin í Trygdargrunninum, Magni á Deild Olsen, er varin at draga ov avgjørdar meiningar burturúr kanningini. *Mynd: ALS*

Magni á Deild Olsen, stjóri í Trygdargrunninum, hevur kunnað nevndina um kanningina, men tekur ikki onnur stig.

- Kanningin verður ikki knýtt til útgjald úr Trygdargrunninum, tí sigur ein møguligur prísmunur einki um, hvørt hann hevur ávirkan á útgjaldið úr Trygdargrunninum, sigur Magni á Deild Olsen.

**Hýsa og toskur dýrast**

Á Fiskamarknaði Føroya hava tey eisini lagt merki til, at munur er á prísinum, sum fæst á uppboðssøluni og prísinum, sum fæst við beinleiðis sølu til virkini.

Høgni Hansen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya, sigur, at hann hevur hugt eftir prísinum frá januar til oktober 2015, og kom hann til, at samlaði miðalprísurin var hægri hjá teimum hesar mánaðirnar. Hýsan var seld fyri tvær krónur meiri kilo, og toskurin var seldur fyri eina krónu meiri.

Hinvegin eru eisini fiskasløg, har lítil og eingin munur er, ella munurin er hinvegin. Svartkalvin var seldur fyri stórtsæð sama prís umvegis Fiskamarknaðin og beinleiðis til virkini.

Men eisini Høgni Hansen ger vart við, at tað er trupult at siga, hvørjar útreiðslur skulu dragst frá fyri at fáa røttu tølini.

Á fiskamarknaðinum skulu skipini gjalda fyri eitt nú landing, havnapengar, fyri kassar, og so er eisini provisjón til Føroya Fiskamarknað.

tekstur og myndir: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** *-PRESS*




Sjónám liggur væl fyri á Vestaru Bryggju í Klaksvík.

# Fjølbroytt virksemi á Sjónámi

Á Sjónámi í Klaksvík útbúgva tey skipsatstøðarar og skiparar. Haraftrat hava tey nógv skeiðsvirksemi sum millum annað trygdarskeið.

Hendan kavaklædda dagin um páskirnar hevur deildarleiðarin á Sjónámi givið sær stundir at greiða frá virkseminum hjá Sjónámi. Stovnurin, sum fyrr hevur hildið til aðrastaðni í Klaksvík, hevur nú høli á Faktorsvegi, heilt har úti á endanum á havnarlagnum. Nærri sjónum ber valla til at koma.

Hølini eru væl innrættað. Hugnalig og snøgg. Og væl útgjørdur er skúlin eisini, millum annað við veldugum hyli og øðrum, sum nýtt verður til ymiskt skeiðsvirksemi. Men tað er friðarligt hendan dagin, næmingarnir eru í páskafrí.

Fryntligi deildarleiðarin, Ragnar Ludvig, tekur í móti. Vit koma fyrst inn í eina matarhøll, haðani inn í eina stór gongd við uppsløgum, listaverkum og øðrum. Upp gjøgnum einar trappur og síðan inn á skrivstovuna hjá deildarleiðaranum. Her er ljóst, og vit síggja beint út á fjørðin. Veðrið er gott, tað hevur hug at blika. Júst sovorðið veður, ið fær drivnar sjómenn at leingjast á sjógvin.

Vit sessast, og Ragnar Ludvig byrjar at greiða frá Sjónámi.

- Sjónám er ein stovnur við trimum høvuðstilboðum, tað er skiparaskúlin, sjófartsskúli, í og við at vit bjóða grundskeið til skipsatstøðara. Og so er tað eisini trygdarmiðstøðin, greiðir hann frá.

**Ójøvn tilgongd**

Tilgongdin til skiparaflokkin hevur verið eitt sindur ójøvn seinnu árini. Í løtuni ganga tólv næmingar á skiparaskúlanum. Men seinnu árini hevur næmingatalið verið úr átta upp í nakrar og tjúgu næmingar.

- Vit taka næmingar inn við hálvum øðrum ári ímillum. Vinnuháskúlin í Havn tekur inn hálva hvørt ár. Mentamálaráðið hevur avgjørt, at tað skal vera soleiðis. Annars er vandi fyri, at ov fáir næmingar eru til báðar útbúgvingarnar, hesa hjá okkum á Sjónámi, og á Vinnuháskúlanum. So tá vit taka næmingar inn, ganga teir hálvt annað ár í skúla hjá okkum, og

heldur fram á næstu síðu >

tá teir eru lidnir, taka vit næsta flokkin inn, sigur Ragnar Ludvig.

Hann heldur, at betri tíðirnar eru, meira arbeiði er til fólk, og færri fara sostatt í skúla. Men í niðurgangstíðum vísir tað seg, at fleiri velja at fara í skúla.

**Tvey vinnubrøv**

Fyri at koma inn á skiparaskúlan, skal næmingur hava 18 mánaðar siglingstíð. Tað ber eisini til at hava sjófartsskúlan á Sjónámi, tað er grundskeiðið til skipsatstøðara, og so koma inn við 9 mánaðar siglingstíð. Tað merkir, at grundútbúgvingin sum skipsatstøðari góðskrivar 9 mánaðar siglingstíð av teimum kravdu 18 mánaðunum.

- Fleiri brúka tað eisini sum lopfjøl inn á skiparaskúlan, sigur Ragnar Ludvig.

Vit fáa okkum upp í kaffikopparnar, og hyggja út á fjørðin. Ragnar Ludvig vísir á, at tú í veruleikanum kann so nógv, hevur tú fyrst tikið skipsatstøðaraútbúgvingina og síðan skiparaútbúgvingina.

- Tú fært tvey vinnubrøv. Eitt er til fiskiskip, har tú kanst vera skipari á øllum fiskiskipum. Men tað krevur kortini eyka siglingstíð. Tú fært eisini eitt vinnubræv til farmaskip á 3. stigi. Tá kanst tú vera stýrimaður á øllum farmaskipum, og tú kanst vera skipari á øllum farmaskipum upp til 3000 bruttotons, sigur hann. (Sí krøv og rættindi hjá skiparum og skipsatstøðarum aðrastaðni í greinini).

**Klaksvíkar sjómansskúli**

Til fyri fáum árum síðan vóru Trygdardepilin, Klaksvíkar Sjómanskúli og Tekniski skúlin í Klaksvík tríggir ymiskir lærustovnar. Í dag eru allir tríggir stovnarnir undir sama hatti, og ovasti stjóri er Rúni Heinesen. Trygdardepilin og Klaksvíkar sjómansskúli



Ein av serstovunum á Sjónámi.

eru lagdir saman til Sjónám, og har er Ragnar Ludvig deildarstjóri.

Klaksvíkar Sjómansskúli byrjaði sítt virksemi sum privatskúli og gjørdist ikki almennur fyrr enn í 1975. Fisher Heinesen byrjaði skúlan, og hildið var í fyrstanini til í skúlanum á Ziskatrø. Fyrsti flokkurin byrjaði 1. oktober 1947. Í 1957 flutti skúlin inn í kjallaran í húsunum hjá Fisher norðuri á Kósini. Har helt skúlin til í 14 ár til 11. januar 1971, tá ið flutt varð inn á Garðavegi 11. Har helt skúlin til líka til 1. oktober í 2012, tá ið bygningurin á Vestaru Bryggju stóð klárur.

**Fleiri útbúgvingar**

Klaksvíkar Sjómansskúli hevur boðið fleiri útbúgvingar út næstan frá byrjan. Í byrjanini var ein setuskiparaflokkur, meðan onkur einstaklingur tók heimaskiparaprógv. So við og við øktist virksemið til eisini at fevna um langfaraskiparaflokk, skiparaflokk og flokk við stýrimonnum.

Klaksvíkar Sjómansskúli bjóðaði ikki bert útbúgvingar til navigatørar. Í 1960 var fyrsta skeiðið í radiotelefoni hildið, og bert eitt ár seinni byrjaði fjarritaraútbúgvingin, sum tók 2 ár. Henda útbúgvingin kundi í Føroyum bert takast á Klaksvíkar Sjómansskúla, líka til hon bleiv tikin av í 1983.

**Skipskokkar**

Hugurin og viljin á Klaksvíkar Sjómansskúla at útbúgva føroyingar til sjóvinnuna var óføra stórur. Og 17. januar í 1972 byrjaði skúlin við skipskokkaútbúgving. Tey fyrstu árini var køkurin hjá Húsarhaldsskúla Føroya nýttur til ta verkligu undirvísingina, men á vári í 1986 stóð køkurin í kjallaranum á Garðavegi 11 liðugur og klárur til nýtslu. Skipskokkaútbúgvingin helt uppat í 2011. Í hennara stað kom ein matvøruútbúgving, ið tekur eitt ár. Hon er skipað sum SIT og er samstundis farin undir Tekniska skúla.

Í august mánaða í 1991 byrjaði fyrsti sjóvinnuflokkurin á Klaksvíkar Sjómansskúla. Hetta var ein útbúgving, ið tók fimm mánaðir. Útbúgvingin var bæði ástøðilig og verklig, og tey lesandi kundu umframt taka dugnaskaparskeið í sigling.

tekstur og myndir: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** *-PRESS*



Í stóru høllini á Sjónámi. Her fer partur av trygdarskeiðunum fram.

**Trygdarskeið**

Í 1991 byrjaði Klaksvíkar Sjómansskúli at hava trygdarskeið fyri sjófólk. Sum við so nógvum øðrum virksemi skúlans, so eru undangongufólk, ið seta í gongd útbúgvingar. Frans Jacobsen gjørdist stjóri í 1985, og tað lá honum frammalaga at víðka virksemi á skúlanum til eisini at fevna um trygdarskeið.

Virksemið innan trygdarskeið gjørdist meiri og meiri, og tí var Trygdarmiðstøðin stovnað í 1999. Øll árini, hon var sjálvstøðugur stovnur, gekk Trygdarmiðstøðin undan at geva sjómonnum skeið í trygd á sjónum umframt onnur skeið, til dømis bátaføraraskeið, FRC og onnur skeið.

Fyrstu tíðina eftir stovnanina helt Trygdarmiðstøðin til á Klaksvíkar Sjómansskúla. Síðan var hon eitt skifti á Tekniska Skúla, til hon í august 2001 flutti í høllini í Bøgøtu 38. Har var hon til oktober 2012, tá ið alt virksemið – saman við tí hjá Klaksvíkar Sjómansskúla – var lagt í tann nýggja bygningin á Faktorsvegi 14 á Vestaru Bryggju.

**Grundskeið til skipsatstøðara**

Í august mánaða í 2014 byrjaði fyrsta grundskeiðið í útbúgving til skipsatstøðara á Sjónámi. Hetta verður mett sum ein ógvuliga viðkomandi útbúgving fyri sjófólk og tekur eitt hálvt ár. Útbúgvingin er bæði ástøðilig og verklig. Tey lesandi kunnu umframt taka dugnaskapsskeið í sigling.



Væl útgjørda fyrstuhjálparstovan.



Ragnar Ludvig, deildarleiðari á Sjónámi, á skrivstovu síni.

Útboðið av skeiðum er økt munandi eins og tørvurin á skeiðum framvegis er stórur. Haraftrat hevur Sjónám gjørt onnur skeið - millum annnað verða serligu trygdarvenjingarnar hjá flogternum hjá Atlantic Airways hildnar hjá Sjónámi.

Vit báðir, Ragnar Ludig og undirritaði, seta kaffikoppin frá okkum hendan kavaklædda dagin um páskirnar, og spáka okkum ein túr gjøgnum skúlan. Eyðkennið eru rúmligu og ljósu hølini. Heilt serligt er tað at koma inn í stóru høllina við stóra hylinum, her partar av trygdarskeiðunum fara fram. Aðrir partar fara fram á Borðoyarvík og í Svimjihøllini í Klaksvík.

Um nakrar fáar dagar verður serliga trygdarvenjingin fyri flokternur hjá Atlantic Airways hildið á Borðoyarvík. Myndafrásøgn frá teirri venjingini sæst aðrastaðni í blaðnum.

## Krøv og rættindi til skiparaútbúgvingina og skipsatstøðaraútbúgvingina - brot úr kunngerðum

Skiparaútbúgving - upptøkutreytir:
*Ref.: Kunngerð nr. 107 frá 20. september 2005 um skiparaútbúgving*
Treytirnar fyri upptøku eru fráfaringarroynd fólkaskúlans við próvtalinum 6 t.e. 2 eftir nýggja próvtalsstiganum í føroyskum, donskum, enskum, alisfrøði, evnafrøði og støddfrøði.
Hevur tú staðið sjóvinnuskúlan, sum nú kallast grundskeið í útbúgvingini til skipsatstøðara, so krevst einans 9 mánaðar siglingstíð við skipum yvir 20 BT. Annars krevst 18 mánaðar siglingartíð til samans við skipum yvir 20 BT.
Galdandi heilsuprógv fyri sjófólk uttan avmarkingar og er skikkaður til útkikk.
Útbúgvingartíð: 1½ ár

Grundskeið í útbúgvingini til skipsatstøðara - upptøkutreytir:
*Ref.: Kunngerð nr. 88 frá 4. august 2014 um grundskeið í útbúgving til skipsatstøðara*
Til upptøku á grundskeið í útbúgvingini til skipsatstøðara skal umsøkjari hava staðið fráfaringaroynd fólkaskúlans, verða fyltur 17½ ár.
Hevur galdandi heilsuprógv fyri sjófólk uttan avmarkingar og er skikkaður til útkikk.
*(Umsøkjari, sum er fyltur 16 ár, kann tó verða upptikin á grundskeið í útbúgvingini til skipsatstøðara, um viðkomandi umsøkjari hevur gjørt útbúgvingaravtalu við eitt reiðarí.)*
Útbúgvingartíð: ½ ár

3 . Endaskeið í útbúgving til skipsatstøðara – Upptøkutreytir – byrjar í januar 2017
*Ref.: Kunngerð nr. 121 frá 11. november 2015 um endaskeið í útbúgving til skipsatstøðara*
Á endaskeiðið í skipsatstøðaraútbúgvingini kunnu persónar takast upp, sum eftir at hava staðið grundskeið í skipsatstøðaraútbúgivngini, hava verið í starvi sum ófulltikin skipsatstøðari umborð á havfarandi handilsskipi størri enn 20 BT í minsta lagi í 6 mánaðar. Hevur galdandi heilsuváttan fyri sjófólk.
Útbúgvingartíð: ½ ár

tekstur og myndir: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** *-PRESS*

# Flogternur til bjargingarroynd

## Eina ferð um árið verður skipað fyri serligari bjargingarroynd fyri komandi flogternum. Bjargingarroyndin fer fram í samstarvi við Sjónám í Klaksvík.

Komandi flogternurnar eru júst komnar í yvirlivilsisdraktirnar, og kenna tí ikki kaldliga lotið við trygdardepilin hjá Sjónámi á Borðoyavík hendan dagin fyrrapartin í apríl mánaði. Fyrireikingarnar til venjingarnar eru byrjaðar, og tú sært á teimum, at tær eru spentar. Ella TEY eru spent, tí okkurt mannfólk er ímillum mongu kvinnurnar.

Janus Joensen, sum er leiðandi instruktørur í dag, roynir at samla flogternurnar í ring á havnarlagnum. Hjálparinstruktørurin Hanus Kjølbro, gongur aftur í fram í froskmannabúna og riggar eisini fyrstu venjingarnar til.

Fyrst skulu tær læra at loypa úr flogfarinum, um vanlukka skuldi hent. Til endamálið er gjørdur ein eftirgjørdur rampi. Flogternurnar skulu loypa úr "flogfarinum" niður á rampan. Í venjingini enda tær á sjónum.

- Hyggið hendanvegin og lurtið væl, rópar Janus Joensen, og hann byrjar at greiða frá tí, sum henda skal.

**Ein ferð um árið**

Hetta er venjing, sum Atlantic Airways hevur snikkað til. Flogternurnar í føstum starvi hava longu verið gjøgnum venjingina í ár, og nú er stundin komin til komandi flogternur. Hetta eru flogternur, sum skulu avloysa í summar, tað er í juni, juli, august og ein part av september mánaði. Hendan venjingin verður gjørd eina ferð um árið – í tøttum samstarvi við Sjónám.

Katrin Kjartansdóttir, sum er flogterna og instruktørur, er væl nøgd við umstøðurnar og førleikarnar hjá Sjónámi.

- Ein sovorðin venjing ella bjargingarroynd kemur øllum væl við. Flogternurnar fáa nógv burturúr, manningin á tyrlunum fær á henda hátt roynt seg, og starvsfólk hjá Sjónámi fáa eisini sínar royndir, sigur hon.

**Duga at venda sær**

Leiðandi instruktørurin greiðir nú flogternunum frá, hvussu tær skulu venda sær, tá tær koma á sjógv. Tað kann henda, at tær koma at liggja á búkinum, og tað kunnu tær ikki leingi í veruleikanum.

- Tí ræður um, at tit duga at venda tykkum í sjónum, sigur Janus Joensen, og hann vísir teimum, hvussu tær skulu venda sær.

Áðrenn byrja verður at loypa, gevur instruktørurin hjá Atlantic Aitways, Katrin Kjartansdóttir, seinastu leiðbeiningina. Á sjónum liggur Hanus Kjølbro tilreiðar at taka ímóti. Flogternurnar skulu eisini duga at svimja í yvirlivilsisdraktunum, tær skulu megna at koma upp í ein bjargingarbát, og so eru tað venjingarnar við tyrluni.

Sambært Katrini Kjartansdóttir, instruktøri, eydnaðist venjingin væl.



Janus Joensen, høvuðsinstruktørur, greiðir flogternunum frá, hvat skal henda.



Katrin Kjartansdóttir, instruktørur hjá Atlantic Airways, fær seinasta orðið, áðrenn lopið verður á bláman.



Tær loypa á eftirgjørda rampin.



Hjálparinstruktørurin, Hanus Kjølbro, er tilreiðar at taka ímóti.


Væl lá fyri at leggja seg í ring.


Ein túr aftrat....


Tær royna at svimja í draktunum.


Nú ræður um at sleppa upp í bjargingarbátin.


Bjargingarbáturin verður sleipaður út á Borðoyavík.


Eftirgjørdi rampin verður tikin í land.


Skjóttgangandi rescue-báturin hjá Sjónámi á veg út á víkina.


Tyrlan hjá Atlantic Airways er byrjað royndirnar úti á Borðoyavík.

tekstur og mynd: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Formenninir í teimum trimum manningarfeløgunum, sum mynda FMU, á eftirmetingarfundi eftir úrslitaleysa fundin í Keypmannahavn seinast í marts. Úr vinstru eru tað Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.

## Hentleikaflagg:

# Skirvisligt norðurlendskt brøðralag

**Føroyska flaggið verður enn mett sum hentleikaflagg, FOC, í altjóða flutningsarbeiðarafelagsskapinum ITF. Føroysku manningarfeløgini royna at fáa flaggið av aftur FOC-listanum, men hini Norðurlondini berjast ímóti. Í næsta mánaða verður aftur ein roynd gjørd í London.**

Flest allir føroyingar eru góðir við Merkið, og eru eisini ernir, tá tað umboðandi Føroyar verður vundið í húnar hátt uttanfyri landoddarnar.

Men sum umboð fyri føroysku altjóða skipaskránna FAS er øðrvísið. Føroyska flaggið á skipshekkuni er alt annað enn høgt í metum hjá hinum londunum í ITF (International Transport Workers' Federation). Har verður tað nevniliga roknað sum hentleikaflagg - FOC (Flag Of Convenience).

### Grannar forða

Føroyar komu á FOC-listan hjá ITF í 2011 eftir trýsti frá hinum Norðurlondunum, serliga Noregi og Svøríki, og tað eru framvegis Norðurlond við Noregi og Svøríki á odda, ið forða fyri, at føroyska flaggið verður tikið av aftur listanum.

Tað gera tey, hóast Føroyar og harvið FAS eru við í øllum altjóða sáttmálum, sum hava til endamáls at tryggja trygd á sjónum, arbeiðsviðurskifti umborð og hýrulágmørk.

Faroe Maritime Union, FMU, sum er samstarvsfelagið hjá teimum trimum manningarfeløgunum Maskinmeistarafelagnum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag, er í vár farið undir enn eina roynd at fáa føroyska flaggið av aftur FOC-listanum hjá ITF.

### Soltið fundarúrslit

Formenninir í teimum trimum feløgunum vóru seinast í mars í Keypmannahavn á einum fyrireikandi fundi við umboð fyri ITF-høvuðsskrivstovuna í London og ITF-fylgibólkin, sum hevur við føroysku FOC-listingina at gera.

Í hesum fylgibólki er ein russi formaður, men annars er hann umboðaður av hinum norðurlendsku sjómannafeløgunum. Hini norðurlendsku yvirmannafeløgini hava ongar trupulleikar av føroyska FAS-flagginum, og eru ikki við í fylgibólkinum.

Men lítið gott spurdist burtur úr fundinum í Keypmannahavn. Meðan umboðini hjá høvuðsskrivstovuni

royndu at vera semjusøkjandi, leitaðu umboðini fyri hini norðurlendsku sjómannafeløgini eftir forðingum fyri, at føroyska flaggið aftur kundi gerast reint í ITF-høpi.

**Proteksjonisma**

Ein eftir øllum at døma sera óumhugsað útsøgn frá umboðnum hjá sjómannadeildini í svenska fakfelagssamtakinum SEKO vísti sambært føroysku FMU-umboðunum ógvuliga greitt sonnu myndina av stríðnum, og hvat veruliga liggur aftanfyri ynskið um framhaldandi at stempla føroyska FAS-flaggið sum FOC.

- Hann segði, at tað kom ikki upp á tal at strika føroyska flaggið av FOC, tí í somu løtu tað hendi, vildu 33 svensk skip flagga út fyri at lata seg skráseta í FAS. So veruliga orsøkin til svartlistingina av FAS er onki annað enn proteksjonisma, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

**Fundur í London**

Men tey bæði føroysku yvirmannafeløgini ætla ikki at gevast á hondum. Í næstum fara umboð fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið til London á fund við ITF. Annfinnur Garðalíð fer væntandi fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag, meðan tað enn er óvist, hvør fer fyri Maskinmeistarafelagið.

- Fundurin er ikki endaliga lagdur enn, men ætlanin er at hava hann í næsta mánaða. Fundurin í Keypmannahavn vísti okkum, hvat tað serliga er, sum hini Norðurlondini royna at argumentera við, tá tey framhaldandi krevja, at vit skulu vera á FOC-listanum, so eg ætli at fyrireika meg væl at møta teimum argumentunum.

- Eitt tungtvigandi argument hjá hinum Norðurlondunum er, at so stórur partur av samlaðu tonnasjuni undir FAS reelt er á útlendskum hondum. Tað sigur seg sjálvt, tí Føroyar er eitt ógvuliga lítið land, og tískil er talið á føroyskum reiðaríum sjálvsagt avmarkað. Men vit halda ikki, at tað er rætt at leggja so stóran týdning í hetta, um viðurskiftini hjá skipunum annars er í lagi, sigur Annfinnur Garðalíð og leggur afturat:

- Eg haldi, at vit hava eina góða søk at berjast fyri í London í mai.

Roynt verður eisini umvegis føroysku sendistovuna í London at bjóða umboðum fyri ITF at taka lut í føroyska flaggdagshaldinum í bretska høvuðsstaðnum. Flaggdagshaldið har verður hildið 27. apríl, tveir dagar eftir sjálvan flaggdagin.

**Heldur raka skip enn flagg**

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum er samdur við formannin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag í, at Føroyar hava eina góða søk í áleikandi flaggstríðnum.

- Vit hava somu standardir sum hini Norðurlondini, og undantikið eitt einstakt reiðarí er onki at koma eftir viðvíkjandi FAS, tá tað snýr seg um arbeiðsviðurskifti og lønir. Sjálvsagt er eitt reiðarí, sum ikki hevur síni viðurskifti í lagi, eitt reiðarí ov nógv. Men soleiðis er tað undir øllum fløggum, eisini teimum, sum ikki eru á FOC-listanum.

- Tí royna vit eisini at tala fyri, at ITF fer at svartlista tey reiðaríini, sum ikki uppføra seg ordiliga, heldur enn alt flaggið og harvið eisini øll tey skipini, sum onki skeivt gera, sigur hann.





KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

FLEIRI FYRIMUNIR,
LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.





Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini? Set teg í samband við okkum.

+298 472030 KSS@KSS.FO WWW.KSS.FO

KSS KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

tekstur: ØSSUR WINTHEREIG OG INGOLF S. OLSEN -PRESS

# 50 fingu prógv í januar

16 skiparar, 14 maskinmeistarar og 20 skipsførarar fingu prógv síni handað á móttøku 22. januar.

Sum siðvenja er, vórðu virðislønir læt-nar til tey bestu og ídnastu. Hægsta miðalpróvtal av øllum hevði skipsfør-arin Jóhann Kartni Johannesen. Gestarøðari í ár var Jógvan Jespersen, stjóri í Felagnum Nótaskip.


Mynd: Erland Hentze Rasmussen.

**Skiparar:**
Sommer Kjærbo,
Sjúrður Jensen,
Sjúrður Ellefsen,
Rúni Hentze Mortensen,
Magnus Hjelm Aanesen,
John Heini Hansen,
Martin Syderbø,
Kenneth Olesen,
Kaj Egil Ólavur Dahl,
Jón Bengt Bergarson Poulsen,
Jóhannes Andrasson Arge,
Jacob Pauli Flemming Joensen,
Daniel Ove Vest,
Dánjal Kjartansson Egholm,
Eyðun Húsgarð
Arnfinn Hansen.

**Virðislønir:**
1. Jákup Pauli Flemming Joensen og Eyðun Húsgarð, kikara frá p/f Thor.
2. Magnus Hjelm Aanesen, barometur og klokku frá Faroe Ship.
3. Sommer Kjærbo, barometur og klokku frá Faroe Agency.

**Ídnisvirðisløn:**
Daniel Ove Vest, lummaur frá Antares.

## Jógvan Jespersen:
# Fastlønarsáttmálar til fiskimenn


Jógvan Jespersen, stjóri, Felagið Nótaskip.

- Hýruøkið eigur at endurnýggjast. Summir av hýrusáttmálunum ganga heilt aftur í slupptíðina, og her er stórur tørvur á nýhugsan. Vit skulu flyta okkum til ein fastlønarsáttmála við skipaðum pensjónsviðurskiftum og skipaðum arbeiðistíðum í fiskiflot-anum.

Tað segði Jógvan Jespersen, stjóri í Felagnum Nótaskipum, í síni røðu, tá maskinmeistarar og maskinistar fingu prógv handað 22. januar.

- Útbúvingarnar á Vinnuháskúlanum hava helst nógv størri týdning, enn vit geva okkum far um, tí tær eru ein lyklaútbúgving og ein grundleggj-andi partur av grundarlagnum undir okkara búskapi.

- Vit eiga at hava eina yvirskipaða ma-ritima ætlan. Tað kundi verið at fingið maritimar fyritøkur at flutt til Føroya, og málið kundi verið at breiðka mari-timu útbúgvingarnar, so tað kundi verði lokkandi hjá útlendingum at komi higar at nema sær útbúgving.

- Føroyingar, Føroyar og havið eru óloysiliga knýtt saman. Vit liggja her mitt í Atlantshavinum. Havið var vegurin til landnámið - til okkara uppruna í síni tíð. Og gjøgnum øld-ir hava vit lært okkum at gagnnýta ríkidømið í havinum og stigvíst skapa eitt grundarlag undir tí vælferðasam-felagnum, sum vit hava í dag, segði Jógvan Jespersen.

Stjórin í Felagnum Nótaskip kom eisini inn á politisku støðuna, nú fiskiloyvini ganga út 1. januar 2018.

- Politiska skipanin má skjótast gjør-ligt tryggja langtíðar karmar fyri fiskivinnuna, tí annars verður eingin menning, segði hann.

**Hægsta miðalpróvtal**
Jóhann Kartni Johannesen, skipsførari, høgrumegin, fekk virðislønina fyri hægsta miðalpróvtal handaða av Eliasi Zachariassen, næstformanni í Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Millum teir báðar sæst skúlastjórin Wilhelm Petersen.



Mynd: Erland Hentze Rasmussen.



Mynd: Erland Hentze Rasmussen.

**Maskinmeistarar:**
Magni Gudmarsson Joensen,
Petur Jacob Heinesen,
Bárður Norðberg,
René Tórgarð,
Fríði Smith Hammer,
Sigmundur F. Olsen,
Brian Evald Jacobsen,
Nils Martin Olsson Djurhuus,
Birgir Birgirsson Hansen,
Hallur Berg,
Jóhannus Johannesen,
Magnus Hendriksson Olsen,
Remi Sørensen
Mortan Olsen.

**Virðislønir:**
1. Magni Gudmarsson Joensen, fartelefon frá Suðuroyar Sparikassa.
2. Petur Jacob Heinesen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.
3. Bárður Norðberg, lummaur frá Antares.

**Ídnisvirðisløn:**
Fríði Smith Hammer, gullur frá A. P. Møller.

tekstur: **ØSSUR WINTHEREIG OG INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*




**Skipsførarar**
Jógvan Højgaard,
Arnold Hjelm,
Bjørn Johansen á Lag,
Johannes Ólavsson,
Karl Danielsen,
Torbjørn Hjelm,
Karsten Joensen,
Jónhard Haraldsen,
Ragnar í Soylu,
Allan Hvalsrætt,
Jóhann Kartni Johannesen,
Jákup Erik Johannesen,
Hermann Johan Dam,
Heri Vitalis Joensen,
Gunn Danielsen,
Fríbjartur Dahl-Olsen,
Bjarti Fríðheim,
Albin Kristoffur G. Rasmussen,
Terji Hjaltalin á Kamarinum
Arngrím Sigurd Thomassen.

**Virðislønir:**
1. Jóhann Karni Johannesen, gullur frá A. P. Møller.
2. Jónhard Haraldsen og Ragnar í Soylu, barometur og klokku frá ávikavist Tryggingarfelagnum og Vinnuháskúlanum.
3. Albin Kristoffur G. Rasmussen, lummaur frá Antares.

**Ídnisvirðisløn:**
Daniel Ove Vest, lummaur frá Antares.

# 21 tóku prógv í Klaksvík

8 skiparar og 13 skipsatstøðarar fingu prógvini á hátíðarløtu á Sjónám í Klaksvík 22. januar, har virðislønir eisini vórðu lætnar.



**Skiparar:**
Aftara rað úr vinstru:
Ragnar Ludvig, deildarleiðari,
Egil Leivsgarð, Klaksvík,
Páll Holm, Rituvík,
Tórður Tummasson Lervig, Klaksvík
Pauli Jacobsen, Sørvági.

Fremra rað úr vinstru:
Jørleif Fornagarð, Fuglafirði,
Hermóður Urbanus Olsen, Klaksvík,
Eli Frederiksberg, Nes
Jacob Justinussen, Leirvík.

**Virðislønir:**
Egil Leivsgarð og Pauli Jacobsen fingu virðisløn frá JFK og Norðoya Sparikassa fyri góð avrik.
Egil Leivsgarð fekk harumframt virðisløn frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyri framúr avrik.



**Skipsatstøðarar**
Aftara rað úr vinstru:
Ragnar Ludvig, deildarleiðari,
Walter Eysturdal Nysted, Klaksvík,
Jákup Debes Joensen, Hoyvík,
Bogi Sørensen, Porkeri,
Jonn Lydersen, Miðvági,
Fríði Potts, Norðskála,
Sørin Kallsgarð Sørensen, Viðareiði
Ásmund Sverri Gaardlykke, Glyvrar.

Fremra rað úr vinstru:
Rúni Hansen, Fuglafirði,
Ari Eyðunsson Thorsvig, Hoyvík,
Hallgrím Gregersen Hansen, Gøtu,
Jóhannes Simonsen, Hvannasund
Magnus Michalsen, Norðdepli.
Regin Sivertsen vantar á myndini.

**Virðislønir:**
Jonn Lydersen og Sørin Kallsgarð Sørensen fingu virðisløn fyri góð avrik frá BankNordik og Eik Banka.

# Níggju maskinistar klæktir í mars

11. mars var aftur próvhandan á Vinnuháskúlanum í Havn, tá níggju maskinistar fingu síni prógv, og virðislønir vórðu handaðar.



*Mynd: Maria Lava Jacobsen.*

**Maskinistar:**
Páll Lauritsen,
Hans Petur Olsen,
Jón Magnusarson Ellendersen,
Mourits Amund Mikkelsen,
Heini Simonsen Østerø,
Regin við Streym,
Kristoffer Andreasen,
Kristoffur Vidtfeldt
Sigmund Ludvig.

**Virðislønir:**
1. Heini Simonsen Østerø, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.
2. Hans Petur Olsen, kikara frá Eik.
3. Kristoffer Andreasen og Regin við Streym, lummaur frá Antares.

Annfinnur Garðalíð formaður



# BROT ÚR DAGBÓK

**17-12-2015**
**Nevndarfundur**
Nevndarfundur í FSN. Viðgerð av innkomnum málum.

**29 -12-2015**
**Aðalfundur**
Aðalfundur felagsins varð hildin í Smærugøtu 9A.

**30-12-2015**
Aðalfundur hjá FFU
Aðalfundur hjá FFU í Smærugøtu 9A. FSN hevði eitt innleygg um limaskap og pensjón.

**06-01-2016**
**Fundur**
Fundur millum manningarfeløgini í FSN.
Fundur í Vinnuhúsinum millum manningarfeløgini og nakrar av uppsjóvar reiðarunum.

**07-01-2016**
**Fundur í FSN**
Manningafeløgin høvdu fund við manningar í fiskiflotanum. Somu høvdu fund við Advokatin hjá manningafeløgunum.
Manningafeløgini og advokatar fyri báar partar høvdu felags fund um tulking av lóg um ES kvotu.

**13-01-2015**
**Fundur í FSN**
Innleiðandi fundur við tey smáu bulk-reiðavirkini um at dagføra sáttmálan.

**14-01-2016**
**Fundur**
Innleiðandi fundur við KAF um dagføring av sáttmálanum viðv. havnarfútum.

**15-16-01-2016**
**Norðurlandahúsið**
Hesar dagarnir luttók FSN á GLS. " Global Leader Ship".

**18-01-2016**
**Fundur í FMU**
Fundur viðv. vali av umboði í nýggja bólkin hjá Poul Michelssen.

**21-01-2016**
**Nevndarfundur**
Fyrsti nevndarfundurin í 2016.

**22-01-2016**
**Sjónám**
Gestarøðari til prógvhandanina í Sjónámi.

**25-01-2016**
**NNK Danmark**
25.- 26.- og 27-01-2016 var Nordisk Navigatørkongress hildin í hølunum hjá Søfartens ledere ( SF ).

**29-01-2016**
**Fundur í Fiskivinnuráðnum**
Fundur í fiskivinnuráðnum. Umrøddu fiskiskap hjá grønlendskum skipum undir grønlendskum flaggi í føroyskum sjógvi.

**25-02-2016**
**Fundur í Nyborg**
Havt fund við Nygaard Shipping um eina sak vegna ein lim okkara. Semja varð gjørd á staðnum.

**29-02-2016**
**Trygdargrunnurin**
Fundur í Trygdargrunninum. Annfinnur til forhoyr vegna úttalisi um rán ella stuðul úr Trygdargrunninum.
Fundur í Kaffi húsinum. Nýskipanarbólkinum boðin inn til kunningarfund.

**01-03-2016**
**Samráðingar**
Avtalaður samráðingarfundur við tey smáu bulk-reiðavirkini. Fundurin avlystur, útsettur til 08-03-2016.

**01-03-2016**
**Fundur í FSN**
FSN bjóðar Johnny í Grótinum til fund um okkara sjónarmið viðv. fiskivinnunýskipan.

**02-03-2016**
**Fundur í FSN við ymiskar limir**
Fundur við LÍV.



Frá fundi millum FMU og ITF í Keypmannahavn 29. mars 2016. Á myndini síggja vit millum onnur Annfinn Garðalíð, formann í Skipara- og Navigatørfelagnum, og Jan Højgaard, formann í Fiskimannafelagnum.

**07-03-2016**
**Nevndarfundur**
Nevndarfundur og fyrireikandi samráðingarfundur vegna smáu BULK skipini.

**10-03-2016**
**Fundur á Hotel Føroyum**
Kunning um Videofundir.
Fundur millum FSN og RFF.

**11-03-2016**
**FMU-fundur hjá MF**
Samráðingarfundur í FSN.
Samráðingarfundur millum FSN og smáu bulk skipini. Ongin semja.

**16-03-2016**
**Fundur millum FSN og RFF**
Skeiðsdagar.

**18-03-2016**
**FMU fundur**
Fyrireikandi fundur til fundin við ITF í Danmark tann 29-03-2016.

**23-03-2016**
**Samráðingar**
Samráðingar millum FSN – Sand og Frakt – Sekstant – Sandgrevstur og Vermland. Fundurin endaði við semju, og nýggjur 1 ára sáttmáli undirskrivaður.

**28–30–03-2016**
**Fundur í KPH**
Fundur millum FMU og ITF um Føroyska flaggið, sum er listað sum hentleika flagg. Tað kom lítið gott burtur úr. Nýggjur fundur verður í London í mai mánaði 2016.

**30-03-2016**
**Fundur í Fiskimálaráðnum**
Fundur í Trygdargrunninum.
Viðgera ymisk mál so sum minstaforvinning og minstuløn.
Fundur í FMU.
Eftirmeting av fundinum millum FMU og ITF.



Í mars vóru samráðingar millum FSN og smáu bulkskipini..



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum



Páll Hansen formaður

## BROT ÚR DAGBÓK

**06-01-2016**
**FSN/ Vinnuhúsið**
Fundur millum manningarfeløgini í sambandi við, at skipini skulu á makrelveiðu í ES-sjógvi. Og hvørja ávirkan hetta hevur á sáttmálarnar. Eftir hendan fundin var farið í Vinnuhúsið á fund við reiðarafelagið og umboð fyri Vinnuna, Faroe Origin. Á hesum fundi greiddu reiðaríini frá síni hugsan um, hvussu málið kundi loysast

**07-01-2016**
**FSN**
Fundur við manningina á Tummas T, har vit hoyrdu teirra ynskir, hvussu málið kundi loysast. Løgfrøðiligi ráðgevin hjá feløgunum kom eisini á hendan fund at greina málið betur. Seinri komi eisini tvey umboð fyri reiðarafelagið. Tosað bleiv eitt sindur um støðuna. Semja var um, at vit skuldu hoyra frá teimum dagin eftir.

**08-01-2016**
Um middagsleitið fingu manningarfeløgini eitt uppskot frá reiðarafelagnum, sum allir partar tóku undir við.
Fundur við landsstýrismannin í vinnumálum. Fyrrapartin hevði Sp/f Fakfelag fund við landsstýrismannin í vinnumálum um keyps tilgongdina í Lív. Eftir hettar hevði maskinmeistarafelagið fund við Landsstýrismannin í vinnumálum, har umboð fyri Sjóvinnustýrið eisini vóru til staðar. Fundurin snúði seg um, at framtøkumegi hjá skipum støðugt verður lækkað. MF er av teirri meining, at SVS ikki umsitur lógina sum hon upprunaliga var ætla.

**15-01-2016**
**MF**
Nevndarfundur. Fýra mál vóru til kunningar og átta til støðutakan - millum annað aðalfundurin og innkomin mál til aðalfundin. Eisini varð tosað um møguliga broyting í manningarlógini um lækkandi framtøkumegi ásettan av max og min. Nýggjan sáttmála fyri Polar Princess.

**18-01-2016**
**MF**
Nevndarfundur í FMU. Feløgini skuldu taka støðu til uppskot frá Poul Michelsen um umboð til arbeiðsbólk at orða nýggjan politikk og strategi fyri føroyska sjóvinnu. MF skeyt upp, at Páll fór í hendan sessin og samstundis frásegði sær sessin í fiskivinnuráðnum til FSN. Og so bleiv.

**03-02-2016**
**Advokatvirkið**
MF og FSN høvdu fund við Páll Nielsen um svarskriv til lønardeildina og SSL um 1. jóladag og langafríggjadag.

**05-02-2016**
**FSN**
Blaðfundur. Eftirmeting av síðsta blaði, víst var millum annað á, at feilur var í innihaldsyvirlitinum . Síðan bleiv tosað um greinar til komandi blað, m.a eftirlit á sjónum, sjónám o.a.



Frá samráðingunum í Keypmannahavn millum umboð fyri Maskinmeistarafelagið og Polar Sea-food.

**10-02-2016**
**Løgmannskrivstovan**
Fyrsti fundur hjá arbeiðsbólkinum um Maritimu Føroyar. Tosað varð um, hvussu arbeiðið í bólkinum skuldi leggjast til rættis. Eisini var komið inn á, hvørji evni skuldi viðgerast.

**18-19-2-2016**
**Keypmannahavn.**
Sáttmála samráðingar við Polar See-food um avtalu fyri Polar Princess. Hetta gekk væl, og 2-ára sáttmáli fyri maskinmeistarar umborð á Polar Princess varð undirskrivaður.
Í høvuðsheitum er talan um dagføringar av garanthýrum og hækking av nøkrum eykapørtum. Ein nágreining viðvíkjandi løn í samband við umvælingararbeiði er eisini gjørd.

**22-02-2016**
**Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið. Fundur um kunngerðirnar viðv. veiðu eftir botnfiski í íslendskum sjógvi í 2016. Og veiðu eftir gulllaksi á føroysku landleiðunum.

**26-02-2016**
**Vinnuháskúli**
Fyrrapart var fundur í Maritima Útbúgvingarráðnum. Á skránni var m.a maskinmeistaraaspirantar. Kunning um gongdina við skiparaaspirantunum og yvirskipaður bygnaður av útbúgvingunum á Vinnuháskúlanum. Seinnapartin Nevndarfundur. Fyrra mál til kunning var Keypstilgongdin í Lív, Polar Princess avtalan, húsavørðar. Ellivu mál vóru til støðutakan, m.a. innkomin uppskot til limagjald, endurskoðan av heimasíðuni o.a.

**29-02-2016**
**ALS-húsið**
Fyrrapartin var fundur í Trygdargrunninum. Fíggjarætlan, ársroknskapur og ásetan av útgjøldum vóru á skráni.
Seinnapartin Kaffihúsið. Johnny í Grótinum hevði boðið inn til kunnandi fund um nýskipan í fiskivinnuni.

**01-03-2016**
**Salingarhella**
Annar fundur í arbeiðsbólkinum um Maritimu Føroyar. Gott prát um útbúgvingar, avleiddar vinnur, marknaðarføring o.a.

**03-03-2016**
**FSN**
Blaðfundur um Mið og Magn. Greinar til komandi blað, og hvør tekur sær av hvørjum.

**08-03-2016**
**MF**
Fundur við Páll Nielsen um komandi aðalfund, har hann skal vera fundarstjóri.

**14-03-2016**
**MF**
Nevndarfundur. Kunna varð um keypstilgongdina í Lív og um komandi fund í Keypmannahavn millum ITF og FMU.
Seks mál vóru til støðutakan. Deila málsøkir, velja umboð til Sø-og handelskyndig, heimasíðan o.a.

**15-03-2016**
**Lív**
MF og FSN á fundi við Lív. Hetta var árligi fundurin, har feløgini fingu kunning um, hvussu farna árið hevði gingist hjá feløgunum við samlagstrygging. Hóast nøkur útgjøld, var árið at rokna sum eitt miðalár.

**21-03-2016.**
**MF**
Stuttur nevndarfundur um støðuna viðv. keypstilgongdini av Lív. Vónandi verður hetta drúgva mál avgreitt fyri ólavsøku.

**29-03-2016**
**Keypmannahavn**
FMU var boðið at koma á fund við ITF og sjómannafelagið í Danmark, Norra og Svøríki. Skráin var, at fáa FO av FOC listanum. Ein sera skuffandi fundur. Umboðini fyri ITF í London vóru sera illa fyrireikað, umboðini fyri sjómannafelagið í Skandinavia ynskti okkum har, sum píparið grør og vildi á ongan hátt hjálpa okkum at koma av FOC - tvørtur í móti. So skandinaviska brøðralagið eksisteraði ikki á hesum fundi.

**01-04-2016**
**Í Fjølsmiðjuni**
Fundur í trygdargrunninum. Fleiri mál á skránni - m.a ásetan av útgjaldi av minstuløn og minsta forvinningi við virknaði frá 1.juni.



Frá fundi millum FMU og ITF í Keypmannahavn 29. mars 2016. Á myndini síggja vit millum onnur formannin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, næstuttast vinstrumegin á myndini.


Rein góðska úr norður Atlantshavi

www.cig.fo









Norðhavnin 8 · Postboks 329 · FO-726 Ánirnar · Føroyar
Tel. +298 20 70 00 · Fax +298 20 70 10
T-postur: cig@cig.fo · www.cig.fo

tekstur: Grækaris D. Magnussen -*PRESS*

BRENNIDEPILIN



# Esmar Müller

**Føddur:** 20.08.69

**Parlagsstøða:** Giftur við Gunnvu Müller. Tey hava trý børn, Dánjal, Mariu og Kára.

**Útbúgving:** Maskinmeistari

**Starv:** Maskinstjóri við Christian í Grótinum

**Hvussu heldur tú útlitini vera hjá maskinmeistarum í dag?**
Útlitini vóru góð, men hjá ungum maskinmeistarum eru tey minni góð – í hvussu er ikki so góð sum tey hava verið. Tað er trupult hjá teimum ungu at sleppa framat, og tað er ikki vorðið lættari við truplu støðuni í norsku oljuvinnuni.

**Hvør er størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara?**
At fylgja við tíðini – at vera dagførdur á allar hættir, soleiðis at tú ert líka nógv umbiðin. At halda seg dagførdan er rættiliga týdningarmikið.

**Nær vart tú fyrstu ferð til skips og við hvørjum?**
Í 1987 við Raðhamar. Tað var ein nýbygdur svartkjaftatrolari. Hann kom í februar í 1987 sum ein partur av skipapakkanum. Raðhamar var verksmiðjuskip.

**Hvat hevur verið longsti túrur tín til skips?**
Góðir tveir mánaðir ella 10 vikur - millum annað við Palla hjá Marionnu.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
Eg fáist við sjálvboðið arbeiði í samkomuni og leguhúsinum Zarepta. Arbeiði eisini rundan um húsini. Havi eisini verið onkran túr við Logos Hope. Vit hava ein 27 fót stuttleikabát, og honum eri eg við onkuntið saman við familjuni.

**Hvat slag av bili hevur tú?**
Ford S-Max.

**Hvørja teldu hevur tú?**
Mac-Book

**Hvør er besta bókin, tú hevur lisið?**
Minniligar hendingar hjá Edvardi í Svínoy kundi verið ein.

**Hvønn tónleik/sang dámar tær best?**
Mær dámar væl TOTO.

**Hvør er besti filmur tú hevur sæð?**
Eg kann nevna onkran úr rúgvuni – Rocky við Sylvester Stallone.

**Hvat kann gleða det í gerandisdegnum?**
At tað gongur væl hjá landi og fólki, og at tað gongur væl hjá familjuni. Eitt gott hál er eisini hugnaligt.

**Hvat kann øsa teg í gerandisdegnum?**
Øvund, smáligheit og sovorðið. Annars eri eg ikki tað slagið, sum gongur runt og øsir seg.

**usedbaader.biz**



NING · Tel +298 215 315

# *BAADER service*
# OG SMIÐJUARBEIÐI

Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.

Fyri at tryggja tær ta allarbestu vøru og tænastu hava vit dugnalig, roynd og ágrýtin starvsfólk, ið alla tíðina mennast, halda standardar og nøkta tínar væntanir.

Vit hava tætt samstarv við útlendskar verksmiðjur, tá vit arbeiða við meira umfatandi uppgávum.

Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.

Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.

BAADER Food Processing Machinery · fomaco FOOD MACHINERY COMPANY · Ubro SystemPac · euskan++ FISH HANDLING SYSTEMS

Bakkavegur 8
530 Fuglafjørður
Tel 775 775
pl@pl.fo
www.pl.fo

peturlarsen
Provider for the fishing industry since 1972

tekstur og mynd: **ØSSUR WINTHEREIG**-*PRESS*


Lassi Borðoy, stjóri í Navit.

# Ringt at halda hvílireglurnar

**Norðurlendska Maskinmeistarafelagið hevur á fundi í Havn víst á, at trupult er hjá reiðaríunum og arbeiðstakarum at halda hvílitíðina. Orsøkin er, at nógv skip eru undirmannað fyri at spara pengar.**

– Eg ivist í, um nakað skip, sum bara siglir í Føroyum, heldur hvílireglurnar. So avgjørdur er Lassi Borðoy, sum er stjóri í Navit, sum er skeiðsfyritøka, ið millum annað bjóðar trygdar- og heilsuskeið til sjómenn.

Núverandi hvílireglur siga, at manningin skal halda frí 11 tímar um samdøgrið, harav skulu seks tímar verða samanhangandi.

Hvílireglurnar eru ásettar sum partur av IMO-konvensjónini og fyri fiskifør eftir MLC-konvensjónini (Maritime Labor Convention).

Norðurlendska Maskinmeistarafelagið hevði í apríl fund í Føroyum, har millum annað reglurnar um hvílitíð vóru til viðgerðar.

-Vit stúra fyri, at reiðaríini framhaldandi manna síni skip soleiðis, at arbeiðstakarar slaka í krøvunum um arbeiðshvíld, sigur Páll Hansen, formaður í Føroya Maskimeistarafelag.

Norðurlendska Maskinmeistarfelagið vísti á, at um reglurnar um hvílitíð ikki verða hildnar, kunnu arbeiðstakari, skipsførari og reiðarí revsast við bót, umframt at skipið kann verða afturhildið.

### Sama manningarskjal

Lassi Borðoy vísir á, at trupulleikin at halda hvílreglurnar ofta stavar frá fyrsta manningarskjalinum, sum verður gjørt, tá skipið verður bygt og biðið verður um góðkenning frá skipaeftirlitunum í tí landinum, har skipið er skrásett.

- Tað fyrsta manningarskjalið skal avspegla raksturin av skipinum. Eitt tangaskip kann vera góðkent at sigla millum Evropa og USA – inni ein dag í hvørjum enda. So verður manningartalið sett eftir tí. Men verður raksturin broyttur, so skipið til dømis skal sigla millum evropeiskar havnir, so kanst tú ikki klára teg við sama manningartali, tí tá kemur tú so ofta í og úr havn, og manningin má bróta vakt, greiðir Lassi Borðoy frá.

- Tað sum ofta hendir er, at reiðaríini broyta lasta- og lossingarmynstrið uttan at søkja um at fáa nýggja manningaráseting.

Lassi Borðoy vísir á, at tað er ein tulking, hvussu stór manningin skal vera fyri at kunna sigla eitt skip trygt og samstundis fáa ta hvíld, sum manningin hevur krav uppá. Í Føroyum er tað Skipaeftirlitið, sum ásetir, hvussu stórar manningarnar skulu vera.

Tá tað er ein tulkingarspurningur, kann tað eisini merkja, at onnur lond

tulka øðrvísi, og tí kunnu júst manningarkrøvini gerast eitt kappingarparametur millum tey ymisku londini.

**Skráseta frívakt**
Skiparin skal mynstra skipið eftir manningarskjalinum, og í skjalinum sæst eisini, hvørji krøv eru til manningina.

Skiparin hevur ábyrgdina at gera eina vaktarskipan, hvussu manningin skal ganga vakt, fyri at skipið skal sigla trygt. Vaktarskipanin skal vera tøk umborð, um ein skipaeftirlitsmaður kemur umborð at gera eftirlit.

Vaktarskipanin skal so vísa, nær teir ymisku mennirnir eru tørnaðir til, men Lassi Borðoy sigur, at nógv dømi eru um, at vaktarskipanin ikki kann haldast.

- Stendur tað, at ein maður hevur havt frí millum klokkan 7 og 9, og skipið hevur lagt til klokkan 8, so mugu menn bróta vakt og hava ikki havt frí, sigur Lassi Borðoy.

Skipamyndugleikarnir eru tí farnir frá at skráseta, nær menn arbeiða, til at skráseta nær menn halda frí fyri at tryggja, at manningin fær nóg nógva hvíld.

Í 2013 skuldu øll lond hava innført IMO-reglurnar um hvílitíð. Frá at vera ein vegleiðing vórðu eitt nú ásetingarnar um hvílitið broytt til eitt krav. Hesi krøvini eru ásett í Manila-konvensjónini undir IMO, sum Løgtingið hevur staðfest.

**Lætt at gloyma frívakt**
Kravið til hvílitíð ella frítíð er, at tá vikan er úti, skal manningin hava havt 77 tímar hvíld ella 11 tímar hvíld um samdøgrið. Samstundis er kravið, at onnur frívaktin skal verða í minsta lagi seks tímar.

Soleiðis er høvuðsreglan, men sjálvandi ber eisini til at bróta vakt, men tá vikan er úti, eigur tímatalvan at vísa, at tú hevur havt 77 tímar hvíld ella frívakt.

- Hetta kann ljóða lætt, men bróta menn vakt, so ber ikki til bara at geva teimum frí. Skipið skal jú siglast, sigur Lassi Borðoy. Einasti máti er at økja um manningartalið.

Lassi Borðoy sigur, at tað, sum ofta hendir, er, at tá menn skulu skráseta sína hvílitíð, so verður lopið um onkrar av eykavaktunum, so tað ikki sæst á vaktartalvuni, at teir ikki halda reglurnar um hvílitíð.

- Vit sjómen eru so loyalir móti reiðarunum. Vit eru so bangnir fyri at missa arbeiðið, at vit eru til reiðar at bróta hvílitíðina, so reiðaríini kunnu spara ein mann ella báðar tveir, heldur Lassi Borðoy.

- Tað álvarsama er, at um menn ikki fáa nóg nógva hvíld, so kann tað ganga útyvir trygdina. Tá friður valdar á brúnni um náttina, so hendir meiri enn so, at svøvnurin ger um seg. Hvílitíðin er til fyri sjómannin og ikki fyri at irritera hann, sigur Lassi Borðoy.

Á nógvum føroyskum skipum sigla teir 6 og 6, og á pappírinum fært tú seks tímar samanhangandi frí, men í roynd og veru skal tú kanska skaffa áðrenn, skifta klæði og annars gera teg kláran.

Norðurlendska Maskinmeistarfelagið stúrir fyri, at reiðaríini framhaldandi manna síni skip soieiðis, at arbeiðstakarar slaka í krøvunum um arbeiðshvíld, eitt nú tá teir ganga 6 og 6.


TÍN TRYGD - ER TÍN ÁBYRGD!

Eru landgonguviðurskiftini trygg ?

Nýtir tú persónliga trygdarútgerð ?

Er bjargingarútgerðin tøk og í lagi ?

Halda tit bjargingar- og brandvenjingar regluliga?

Yvirheldur tú kravdu hvílutíðina ?

- eisini vit vilja,
at tú ert trygg/-ur!

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sjóvinnustýrið . Inni á Støð 22 . Postrúm 28 . 370 Miðvágur . Tlf 35 56 00 . Fax 35 56 01 . Teldupostur fma@fma.fo . Heimasíða www.fma.fo

# FØÐINGARDAGAR



## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Andrias Danielsen, Strendur | 9/1-1946 | 70 ár |
| Sjúrður Kjølbro, Klaksvík | 4/6-1946 | 70 ár |
| Arni Danielsen, Sumba | 11/6-1946 | 70 ár |
| Klæmint Nicodemussen, Sandur | 30/7-1946 | 70 ár |
| Svend Arni Andreassen, Hoyvík | 8/8-1946 | 70 ár |
| Eyðfinn R. Johansen, Miðvágur | 19/5-1956 | 60 ár |
| Jóannes Gunnleif Hansen, Tórshavn | 20/6-1956 | 60 ár |
| Jón Thorleifsson, Skáli | 6/7-1956 | 60 ár |
| Johannes Mittelstein, Skopun | 14/7-1956 | 60 ár |
| Sigurd Poulsen, Tórshavn | 29/7-1956 | 60 ár |
| Poul Juul Mikkelsen, Froðba | 30/7-1956 | 60 ár |
| Bjarni Petersen, Kollafjørður | 3/8-1956 | 60 ár |
| Árni M. Absalonsen, Viðareiði | 10/8-1956 | 60 ár |
| Finn Hentze, Tórshavn | 13/8-1956 | 60 ár |
| Jákup Karstin Ljósstein, Skopun | 16/8-1956 | 60 ár |
| Harry Abrahamsen, Streymnes | 17/8-1956 | 60 ár |
| John Andrew Johannesen, Tvøroyri | 18/8-1956 | 60 ár |
| John Joensen, Vestmanna | 16/5-1966 | 50 ár |
| Petur Meinh. E. Jacobsen, Sandavágur | 7/6-1966 | 50 ár |
| Niels Pauli Magnusson, Klaksvík | 21/6-1966 | 50 ár |
| Hans Jacob Vitalis, Viðareiði | 23/6-1966 | 50 ár |
| Janus L. Samuelsen, Fuglafjørður | 9/7-1966 | 50 ár |
| Johan Jacob Olsen, Sørvágur | 14/7-1966 | 50 ár |
| Petur S. Petersen, Skáli | 24/7-1966 | 50 ár |
| Jóhan Kristiansen, Gjógv | 25/7-1966 | 50 ár |
| Henrik Hammer, Tórshavn | 2/8-1966 | 50 ár |
| Finnbjørn Mikkelsen, Tórshavn | 18/8-1966 | 50 ár |
| Bogi Petersen, Vágur | 28/8-1966 | 50 ár |
| Mortan Holm Norðberg, Vágur | 31/8-1966 | 50 ár |
| Elnar Holm, Porkeri | 23/5-1976 | 40 ár |
| Heri Henriksen, Klaksvík | 3/6-1976 | 40 ár |
| Jan Haldansen, Vestmanna | 22/6-1976 | 40 ár |
| Pól Flosi Pólsson, Tórshavn | 4/7-1976 | 40 ár |
| Kristian Oskar Henriksen, Sandur | 23/7-1976 | 40 ár |
| Tryggvi Breyt Hermansen, Streymnes | 9/8-1976 | 40 ár |
| Pauli Justinussen, Skáli | 23/8-1976 | 40 ár |
| Benny Samuelsen, Sørvágur | 26/6-1986 | 30 ár |
| Karstin Vang, Kvívík | 26/8-1986 | 30 ár |

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Súni Rasmussen, Tórshavn | 1/7-1946 | 70 ár |
| Petur Winther, Vágur | 13/8-1946 | 70 ár |
| Michael Sólheyg, Nuusuaq | 28/6-1956 | 60 ár |
| Tommy Jacobsen, Klaksvík | 20/7-1956 | 60 ár |
| Kristian M. Mellemgaard, Klaksvík | 10/8-1956 | 60 ár |
| Dánjal Joensen, Miðvágur | 13/8-1956 | 60 ár |
| Ejling Petersen, Hov | 30/8-1956 | 60 ár |
| S. Tórarinn Suni Didriksen, Válur | 29/5-1966 | 50 ár |
| Jógvan Mørkøre, Klaksvík | 9/7-1966 | 50 ár |
| Dia á Roykheyggi, Runavík | 3/8-1966 | 50 ár |
| Poul Jóhannus Poulsen, Eiði | 6/8-1966 | 50 ár |
| Christian Weihe, Skáli | 29/6-1966 | 50 ár |
| Hardi Hansen, Norðragøta | 25/5-1976 | 40 ár |
| Eyðun Matras, Fuglafjørður | 28/6-1976 | 40 ár |
| Jens Arne Kruse Sørensen, Eiði | 23/7-1976 | 40 ár |
| Heri Vang, Klaksvík | 10/5-1986 | 30 ár |
| Terji Nón, Fuglafjørður | 14/5-1986 | 30 ár |
| Olgar Jan Sámalson Lervig, Skáli | 9/7-1986 | 30 ár |
| Einar A. Petersen, Fuglafjørður | 16/7-1986 | 30 ár |
| Dan Heðin Eli Poulsen, Sumba | 20/8-1986 | 30 ár |

## Áheitan!

Bæði Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hava ávísar trupulleikar við ófullfíggjaðum limalistum. Tað eru serliga upplýsingar um teldupostadressur, sum vanta.
Við hesum heita feløgini tí á limirnar, sum ikki longu hava gjørt tað, um at senda teimum limaupplýsingarnar – navn, bústað og teldupostadressu.

Upplýsingarnar til Føroya Skipara- og Navigatørfelag skulu sendast til **fsn@fsn.fo.**

Upplýsingarnar til Maskinmeistarafelagið skulu sendast til **mf@mf.fo**.




# Tryggja **teg** og **tíni kæru**





## Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.

Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

Um tú gerst óarbeiðsfør/-ur, er gott at hava eina **óarbeiðsføristrygging**. Henda dekkar teg, um tú verður í minsta lagi 2/3 óarbeiðsfør/-ur. Gjaldið er eitt gott ískoyti til almennu veitingina, sum tú fært.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna.
Viðgerðartryggingin tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum. Tryggingin veitir tær m.a. viðgerð hjá fysioterapeuti, kiropraktori, sálarfrøðingi o.s.fr. Harumframt skurðviðgerð á privatsjúkrahúsinum hjá Mølholm Forsikring.

**Set teg í samband við okkum á tel 345 600 ella tf@trygging.fo og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

NØRNA.FO



# Vit hava deilt vinningin millum allar kundar okkara í 50 ár

– og tí halda vit fram við

www.liv.fo